

# ÁRSFRÁGREIÐING OG ÁRSROKNSKAPUR 2008

# ÁRSFRÁGREIÐING OG ÁRSROKNSKAPUR 2008

# ÁRSFRÁGREIÐING OG ÁRSROKNSKAPUR 2008

Ritstjórnað og lagt til rættis: Leivur Hansen, samskiftisleiðari
Myndir: Per á Hædd, Sendistovan, SEV
Uppseting og prentumsiting: Sendistovan
Upplag: 800

# INNIHALDSYVIRLIT

Frágreiðing frá nevndini . . . 4
Sev eitt gott arbeiðspláss . . . 6
Starvsfólkatiltøk í 2008 . . . 8
Nýggi bygnaðurin . . . 9
Ársfrágreiðing 2008 . . . 10
Býtisvirkini . . . 21
SEV stuðlar áhugavedari kanning av sjóvarfalsorku . . . 22
Ein nevnd hevur avloyst stýrið . . . 24
3.200 nýggir talgildir elmátarar settir upp . . . 25
Minsti skúlin vann ársins SEV-kapping um orkunýtslu . . . 26
SEV stuðlaði TACC . . . 27
SEV kunnað lndsmyndugleikarnar um 10-ára útbyggingarætlanina . . . 28
SEV skjótt undir Eiði 2 suður . . . 28
Grønur rokniskapur . . . 30
Umhvørvið . . . 31
Soleiðis minka vit orku-nýtsluna og $CO_2$-útlátið . . . 32
Umfatandi dagføringar gjørdar á Sundsverkinum . . . 33
Varandi orkukeldur lykilin til eina bjarta framtíð . . . 34
SEV stuðlar føroyskum granskara uttanlands . . . 36
Elframleiðslan vaks 2,4% í 2008 . . . 38
Streymurin fór 27 ferðir í fjør . . . 38
Nýggj háspenningsfeltir á elverkinum á Strond . . . 40
Elveitingarlógin og SEV . . . 40
Nýggjur sjókaðal til Sandoynna . . . 42

# FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI

## NÝGGJ NEVND

1. januar 2009 komu nýggju viðtøkur felagsins í gildi. SEV virkar nú eftir eini smidligari, virknari og meira tíðarhóskandi skipan enn frammanundan. Felagið er framhaldandi eitt lutafelag, men er nú skipað eftir partafelagslíknandi leisti.

Á fyrsta aðalfundi felagsins 6. februar í ár varð nýggj nevnd vald. Í nevndina komu Niels Olaf Eyvindsson, valdur fyri Suðuroyar valøki, Páll á Reynatúgvu, Sandoyar valøki, Marin Katrina Frýdal, Tórshavnar kommuna, Pauli T. Petersen, Streymoyar valøki, Jákup Suni Lauritsen, Vága valøki, Kári E. Jacobsen, Eysturoyar valøki, og Steinbjørn O. Jacobsen, Norðoya valøki. Nevndin hevur skipað seg við Pálli á Reynatúgvu sum formanni og Jákup Suna Lauritsen sum næstformanni.

## ELVEITINGARLÓGIN

Frá 1. januar 2009 skal alt netvirksemið og øll framleiðsla av el bert innast av veitarum, sum eftir nevndu lóg hava loyvi frá Elveitingareftirlitinum. Stór orka er løgd í samstarv og samráðingar millum Elfelagið SEV og Elveitingareftirlitið um at lúka treytirnar í nýggju lógini. SEV fekk øll loyvi tann 30. desember 2008 í fyribils útgávu, sum eru galdandi til 1. juni 2009. Samskift verður framvegis um endaligu treytirnar.

SEV tekur nýggju lógina til eftirtektar og kann til fulnar taka undir við endamálinum í henni. Tó er umráðandi, at myndugleikin á økinum og SEV vísa ábyrgd og semjast um treytirnar, sum settar verða í loyvunum.

## INNANHÝSIS BROYTINGAR Í SKIPANINI

Skipanin av felagnum er styrkt við tveimum nýggjum stápum. 1. november 2008 varð Annika F. Berg sett í starv sum leiðari av nýggju heilsu-, trygdar- og umhvørvisdeildini, og 1. januar 2009 varð Leivur Hansen settur í starv sum leiðari av nýggjari samskiftisdeild.

Um sama mundið samtykti undanfarna stýrið nýggjan politikk á heilsu-, trygdar- og umhvørvisøkinum. Arbeitt verður í løtuni við at menna eina skipan til tess at SEV frameftir kann útvega sokallaðan grønan roknskap fyri virksemi sítt.

Eisini er størri broyting farin fram innan rakstur og framleiðslu. Frá 1. januar 2009 at rokna eru báðar deildirnar lagdar saman við Finn Jakobsen sum deildarstjóra og hesum fimm persónum sum deildarleiðarum: Jón A. Nielsen, Anders Nedergaard-Hansen, Terji Nielsen, Høgni Hansen og Dánjal Jógvan Hansson.

## FÍGGJARLIGT HALL Í 2008

Árið 2008 hevði sínar avbjóðingar við sær. Samlaða úrslitið hjá SEV varð eitt hall uppá 31,1 mió.kr. ímóti einum mettum halli upp á 1,6 mió. kr. í fíggjarætlanini fyri 2008 ella 29,5 mió.kr. verri enn roknað var við í upprunaligu ætlanini frá nov. 2007.

Sølan fyri árið var sum ætlað, men útreiðslunar vóru størri enn mett. Methøgi oljuprísurin bar í sær eina útreiðslu til oljukeyp uppá 120 mió. kr. ella 17 mió.kr. meira enn lagt var upp fyri í fíggjarætlanini. Í sambandi við umbyggingar á Sundsverkinum varð ein útreiðslupostur uppá einar 5 mió.kr., ið eftir ætlan skuldi fremjast í 2009, framskundaður til 2008. Umvælingar av oljutangum í Vági og á Sundi hava verið einar 5 mió.kr dýrari enn roknað varð við. Eisini kostaði rakstur av Elveitingareftirlitinum felagnum umleið 1 mió.kr.

Árini 2007 og 2008 vísa greitt, at vit eru sera heft at oljuprísinum og teimum sveiggjum, sum eru á hesum óstøðuga marknaðinum. So bara út frá einum búskaparligum sjónarhorni er tað sera umráðandi at gerast óheftur av oljuni. Harumframt koma so eisini umhvørvisatlitini.

## ELFRAMLEIÐSLA ÚR VARANDI ORKUKELDUM

Í 2008 vóru 40% av elframleiðsluni úr varandi orkukeldum, býtt við 35% frá vatnorkuverkunum og 5% frá vindmyllunum.

Øll neyðug loyvi eru nú komin, soleiðis at samlaða útbyggingin av Eiði 2 kann fremjast. Arbeitt verður við at seta hetta í verk skjótast gjørligt og fer hetta at økja vatnorkuframleiðsluna við umleið 17%.

Elveitingareftirlitið hevur boðað frá, at nýtt útboð av vindmyllum verður lýst í heyst. Helst verður talan um at bjóða eini 3 MW út og svarar hetta til eina øking av vindorkuframleiðsluni uppá útivið 75%.

SEV hevur sett sær fyri, at øll viðurskifti í sambandi við vind- og vatnpumpuskipan skulu lýsast sum skjótast. Millum annað skal finnast fram til, hvør tøkni kann brúkast, og eisini skulu allir møguleikar fyri útbygging í landinum lýsast.

Á seinasta umboðsnevndarfundinum í søgu felagsins, sum varð hildin 21. november 2008, varð ein 10 ára ætlan fyri útbyggingar løgd fram. Nýggja nevndin í SEV metir tað hava stóran týdning at gera langtíðarætlanir innan orkuøkið í landinum, serliga við atliti at varandi orkumøguleikum. Nevndin er ikki líðug at viðgera 10 ára ætlanina hjá undanfarna stýri.

Neyðugt er, at politisk støða verður tikin rættiliga skjótt til, hvussu útbyggjast skal komandi árini, fyri at røkka málunum í almenna orkupolitikki Føroya. Í hesum sambandi er eisini neyðugt við felags stevi og góðum samskifti millum SEV og landsmyndugleikarnar, sum vara av el-, orku- og náttúruøkinum.

Nevndin í SEV hevur játtað stuðul á 250.000 kr. til verkætlan hjá Fróðskaparsetrinum undir leiðslu av Knud Simonsen lektara á Náttúruvísindadeildini at kortleggja møguleikarnar fyri at gagnnýta sjóvarfallsorku kring Føroyar.

Alduorkuverkætlanin hjá P/F Sewave hevur í eina tíð verið í tungari aldu. Hetta av vantandi áhuga hjá skotska felagnum Wavegen, sum átti helvtina av felagnum. Hetta er nú loyst við at SEV hevur yvirtikið teirra part og verður verkætlanin júst nú endurskoðað. ES hevur játtað stuðul til verkætlanina, og SEV er tilreiðar at veita ávísa upphædd aftrat til endamálið, tó undir teirri treyt, at onnur eisini koma við munandi upphæddum.

## FRAMTÍÐIN

Evropa hevur fram til 2020 ásett sær sokallaðu 20/20/20 krøvini. Londini í Evropa hava við hesum álagt sær sjálvum innan 2020 at minka um orkunýtsluna við 20%, minka um útlátið av vakstrahúsgassum við 20% og økja um framleiðsluna av varandi orku til 20%.

Semja tykist eisini at vera um, at hesi málini bert kunnu røkkast við einari miðvísari elektrifisering av orkunýtsluni og serliga tí partinum, sum verður nýttur á landi. Tí kann roknast við eini støðugari menning innan eltøknina til flutnings- og upphitingarendamál næstu nógvu árini. Hetta eiga vit í SEV at hava í huga og leggja okkum í geyma í framtíðar útbyggingarætlanum okkara, bæði tá talan er um varandi orku og netveitingar sum heild.

## GRANSKING OG MENNING

Sum orkuveitari í landinum, er neyðugt, at kommunurnar, sum eigarar av SEV, taka á seg ábyrgd innan gransking og menning innan framtíðar orkumøguleikar.

Samanumtikið eiga vit stóru uppgávuna sum framtíðar orkuveitari í landinum við øllum tess avbjóðingum, men vit eiga eisini stóru ábyrgdina mótvegis komandi ættarliðum av orkunýtarum, komandi ættarliði av føroyingum. Og ta ábyrgdina eiga vit at taka á okkum sum búgvin partur av heimssamfelagnum.



Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður

# SEV – EITT GOTT ARBEIÐSPLÁSS

Av teimum útivið hálvtannaðhundrað starvsfólkunum hevur ein fjórðingur – 37 – verið í starvi í 25 ár ella meira.

**Aldur – øll starvsfólk 2008**




**Starvsaldur – øll starvsfólk 2008**




Starvsfólkatalið hjá SEV hevur verið støðugt seinastu árini. Í løtuni eru 148 fólk í starvi hjá Elfelagnum ímóti umleið 200 fyri tjúgu árum síðani.

Av teimum útivið hálvtannaðhundrað starvsfólkunum starvast 25 í fyrisitingini, 62 á framleiðsludeildini, 37 á rakstrardeildini, 7 á verkfrøðingadeildini, 6 á eltøknideildini og 8 á innleggingardeildini.

## SAMSKIFTISLEIÐARI OG HTU-LEIÐARI

Fyri at styrkja samskiftið bæði innan- og uttanhýsis, varð avgjørt at seta ein samskiftisleiðara. Ráðgeving og samskipan eru lyklauppgávur hjá samskiftisleiðaranum, sum eisini hevur orkuráðgevingina og heimasíðuna undir sær. Leivur Hansen byrjaði í hesum starvinum 1. januar 2009.

HTU stendur fyri heilsu, trygd og umhvørvi. SEV arbeiðir á einum høgum støði, tá ið tað snýr seg um heilsu, trygd og umhvørvi bæði innan- og uttanhýsis. HTU-økið er í støðugari menning, og SEV ynskir at ganga á odda hesum viðvíkjandi. Tí varð avgjørt at styrkja økið við at seta eitt fólk burturav at taka sær av heilsu, trygd og umhvørvi. HTU-leiðarin skal samskipa og ganga á odda fyri hesi menning, eins og ráðgeva leiðslu og starvsfólkum í HTU-spurningum og samskipa undirvísingina á økinum. Annika Flagstad Berg byrjaði í starvinum sum HTU-leiðari 1. november 2008.

## FYRISITING

Økið undir deildarstjóranum fyri fyrisitingina er býtt í fýra eindir – fíggjarbókhaldið, debitorbókhaldið, starvsfólkadeildin og fyrisitingin. Samanlagt starvast 20 fólk í teimum fýra eindunum – tey flestu á skrivstovuni á Landavegnum í Tórshavn, men SEV hevur eisini skrivstovur í Klaksvík, Vestmanna og Vági. Fleiri av starvsfólkunum eru ikki bert knýtt at teirri eini eindini, men røkja uppgávur innan fleiri økir.

Samanlagt starvaðust 25 fólk í 2008 undir stjóranum og deildarstjóranum fyri fyrisitingina. Miðalaldurin var 49 ár og miðalstarvsaldurin 14 ár. í 2008 høvdu tvey teirra – ella 8% starvast hjá SEV í 25 ár ella meira. Flestu starvsfólkini innan hetta øki eru lønt sambært sáttmálanum millum Elfelagið SEV og Starvsmannafelagið.

## TØKNI

Økið undir deildarsjóranum fyri tøkni er býtt upp í 5 deildir – framleiðsludeildin, rakstrardeildin, verkfrøðideildin, eltøknideildin og innleggingardeildin.

Framleiðsludeildin fatar um øll elverkini og smáverkini kring alt landið. Innan hetta øki eru 62 fólk í starvi. Miðalaldurin er 52 ár og miðalstarvsaldurin 14 ár. Í 2008 høvdu 18 starvsfólk – ella 29% – innan framleiðsluna starvast hjá SEV í 25 ár ella meira. Útvið tveir triðingar av starvsfólkunum innan framleiðsluna eru maskinmeistarar, og ein triðingur eru handverkarar og arbeiðsfólk. Í juni mánaða 2008 varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar í starvi hjá SEV. Gamli sáttmálin við Maskinmeistarafelagið gekk út 1. juli 2008. Ein týðandi broyting var, at maskinmeistarar í starvi hjá SEV frá 1. oktober 2008 vórðu fluttir yvir í lønartalvuna og viðbótarskalan hjá Fíggjarmálaráðnum fyri alment settar maskinmeistarar á landi.

## RAKSTRARDEILDIN

Rakstardeildin fatar um alt linjuøkið, býtt í norðurøkið, miðøkið og suðurøkið. Eisini goymslan og verkstaðurin hoyra til rakstrardeildina. 37 fólk starvast innan hetta øki. Miðalaldurin er 48 ár, og miðalstarvsaldurin er 19 ár. Í 2008 vóru tað 14 starvsfólk – ella 38% – á rakstrardeildini, sum høvdu starvast hjá SEV í 25 ár ella meira. Starvsfólkini á rakstardeildini eru nøkulunda javnt býtt millum sáttmálan millum Elfelagið SEV og Starvsmannafelagið fyri linjuformenn, sáttmálan millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna fyri linjufólk/montørar í starvi hjá SEV og Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag. Sáttmálin við handverkarafeløgini fór úr gildi 1. oktober 2008, og varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður 12. desember 2008. Ein týðandi broyting var, at handverkarar í føstum starvi hjá SEV vórðu fluttir yvir í fastlønarskala, frá at hava verið tímaløntir.

## VERKFRØÐINGADEILDIN

Verkfrøðingadeildin er tvørgangandi deild, sum arbeiðir við tvørgangandi verkætlanum og ráðgeving. Á verkfrøðingadeildini eru 7 verkfrøðingar, og eru teir løntir sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelagið. Hesin sáttmáli má sigast at hava havt ein tungan burð. Sáttmálin millum Verkfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið fór úr gildi 1. oktober í 2007. Tey fýra feløgini Føroya Byggifrøðingafelag, Føroya Verkfrøðingafelag, Arkitektafelag Føroya og Magistarafelag Føroya avgjørdu at stovna Akademikarafelag Føroya og fóru á hesum grundarlagi saman til samráðingar um nýggjan sáttmála. Seinni varð semja gjørd millum Akademikarafelagið og Fíggjarmálaráðið, men var hendan treytað av, at Akademikarafelagið varð sett á stovn. Ikki fyrr enn seinast í 2008 varð Akademikarafelagið veruleiki, og sáttmálin fekk við tí gildi. Sáttmálin hevur broytingar við sær fyri verkfrøðingarnar, millum annað við tað at viðbótarskalin fellur burtur, og viðbøturnar verða íroknaðar mánaðarlønina.

## ELTØKNIDEILDIN

Eltøknideilin er eisini tvørgangandi deild og hevur mest við tann eltøkniliga partin av elverkunum at gera. Á eltøknideildini eru 6 starvsfólk. Innleggingardeildin er landsfatandi deild og hevur við allar innleggingar at gera eins og eftirlitsuppgávur. Á innleggingardeildini eru 8 starvsfólk. Starvsfólkini á eltøknideildini og innleggingardeildini eru lønt sambært sáttmálanum við Starvsmannafelagið og sáttmálanum við Handverkarafeløgini.

Á verkfrøði-, eltøkni- og innleggingardeildini, saman við deildarstjóranum fyri tøkni og teimum størvum sum hoyra beinleiðis undir hann, starvast íalt 24 fólk. Miðalaldurin er 48 ár og miðalstarvsaldurin er 12 ár. Av hesum eru tað 3 starvsfólk – ella 12,5% – sum hava starvast hjá SEV í 25 ár ella meira.

Samanlagt vóru í 2008 148 starvsfólk. Miðalaldurin á starvsfólkunum var 50 ár og meðalstarvsaldurin 15 ár.



*Oluffa undir Kletti, starvsfólkaleiðari, Annika F. Berg, HTU-leiðari, og Leivur Hansen, samskiftisleiðari.*



*Tónleikur er altíð ein partur av starvsfólkatiltøkunum hjá SEV.*

# STARVSFÓLKATILTØK Í 2008

Starvsfólkafelagið hjá SEV hevur verið sera virkið í 2008. Í nevndini hava sitið Jón Nielsen, Anna Vang, Martin Dam og Otto West. Fyrsta tiltakið, tey skipaðu fyri í 2008, var føstulávintshald á Havnarverkinum. Hetta tiltak varð útsett tvær reisir vegna ódnarveðrið, sum var í januar og februar mánaða, og sum kravdi, at okkara starvsfólk vóru til arbeiðis.

Starvsfólkadagur var 9. mai í Mentunarhúsinum í Fuglafirði, og var starvsfólkafelagið við til at skipa fyri hesum saman við starvsfólkadeildini. Fyrrapartin var kunning frá leiðsluni á skránni. Seinnapartin fingu vit vitjan av Kristine Stricker Hestbech, sum helt fyrilesturin: „Det flydende rum – at være menneske i en centrifuge.“ Ein sera áhugaverdur og viðkomandi fyrilestur. Aftan á var rundvísing í Fuglafirði. Dagurin endaði við døgurða í Mentunarhúsinum.

Í dýrdarveðrinum mikumorgunin 14. mai 2008 løgdu vit frá landi av Bursatanga í Havn og starvsfólkaútferðin 2008 var byrjað. Leiðin gekk til Stóru Dímun, Skúvoyar og Klæmintsgjógv. Starvsfólkafelagið skipaði fyri hesum ógloymandi túri.

Starvsfólkadagur var 28. november í egnum hølum í Vestmanna, og var starvsfólkafelagið við til skipa fyri hesum eisini. Fyrst á skránni var kunning frá leiðsluni, síðani var árligi fundurin hjá starvsfólkafelagnum. Teir báðir Tórmóð Nielsen og Eyðbjørn F. Petersen fingu ársins herðaklapp fyri teirra stóra avrik á Skopunarverkinum, sum hevur veitt Sandoynni streym, meðan bíðað hevur verið eftir nýggjum sjókaðali til Sandoynna. Val var til nevndina í starvsfólkafelagnum og vóru Sjanna Hentze og Karsten Hansen vald fyri Jón Nielsen og Martin Dam, sum ikki stillaðu upp aftur. Síðani varð farið í Vestmanna kirkju, har Djóni Dalsgarð og Martin Joensen framførdu. Tónleikinum stóð Martin fyri, og Djóni greiddi frá um enneagrammið. Ein sera hugtakandi løta í hugnaligum umhvørvi. Dagurin endaði við jólaborðhaldi um kvøldið.

Jólaveitsla fyri børnum var 4. desember á skrivstovuni á Landavegnum í Havn. Jólamaðurin vitjaði, og dansað varð um jólatræið.

## NÝGGI BYGNAÐURIN

Fyri at gera SEV enn betri ført fyri at taka av framtíðar avbjóðingum, eru tillagingar gjørdar í bygnaðinum í 2008 og var komið á mál við hesum 1. januar 2009. Fyrr var SEV skipað við einum stjóra og trimum deildarstjórum – ein fyri framleiðsluna, ein fyri býtisvirkini og ein fyri fyrisitingina. Nú er ein stjóri og tveir deildarstjórar – ein fyri tøkni og ein fyri fyrisiting. Hetta merkir í stuttum, at framleiðslan og býtisvirkini eru løgd undir ein deildarstjóra.

### STÁPUR

Fýra starvsfólk hava beinleiðis tilvísing til stjóran. Hesi eru: skrivarin, KT-leiðarin, samskiftisleiðarin og HTU-leiðarin. Hesi bæði síðst nevndu eru nýggj størv.



*SEV-stápurin á einum av vikuligu fundum sínum: F.v. Oluffa undir Kletti, starvsfólkaleiðari, Annika F. Berg, HTU-leiðari, Leivur Hansen, samskiftisleiðari, Finn Jakobsen, tekniskur stjóri, John P. Danielsen, fíggjarstjóri, og Hákun Djurhuus, stjóri.*



# ÁRSFRÁGREIÐING 2008

Ársfrásøgnin verður løgd fram fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning. Úrslitið, kr. -31.137.888, verður flutt til næsta ár.

*Tórshavn, hin 3. apríl 2009*

## NEVND:

Páll á Reynatúgvu, form.
Jákup Suni Lauritsen, næstform.
Marin Katrina Frýdal
Steinbjørn O. Jacobsen
Kári E. Jacobsen
Niels Olaf Eyvindsson
Pauli T. Petersen

## STJÓRN:

Hákun Djurhuus

## FÍGGJARLEIÐSLA:

John P. Danielsen

## ALMENT

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum, á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi. Eftir elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir hefta fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum yvirfyri starvsfólkunum.

## FÍGGJARLIG LÝSING

Rakstrarúrslitið fyri 2008 gjørdist eitt hall uppá 31,1 mio. kr. móti einum avlopi uppá umleið 12 mio. kr árið fyri. Eftir fíggjarætlanini fyri 2008, samtykt í november 2007, varð roknað við einum rakstrarhalli uppá knappar 2 mio. kr.

Inntøkurnar gjørdust einans 0,5 mio. kr minni enn roknað varð við í fíggjarætlanini. Uppgjørda elsølan vaks 11,4%. Meginparturin av inntøkuhækkingini stavar frá, at allir elprísir hækkaðu 10 oyru/kWh frá 1. januar 2008.

So gott sum øll inntøkan hjá SEV stavar frá sølu av elmegi. Avroknaða elsølunøgdin í kWh vaks 0,8% í mun til árið fyri, meðan elframleiðslan, uppgjørd við árslok, vaks 2,4%. Forskjótingar í tíðarskeiðnum fyri avroknaða ársuppgerð av elkundunum eins og forskjótingar av nýtsluni ímillum teir ymisku elprísbólkarnar ávirka samanburðin frá ár til ár eitt sindur. Tí er vøksturin í elframleiðsluni, sum verður uppgjørd við árslok á hvørjum ári, ikki neyvt hin sami, sum vøksturin í uppgjørdari elsølu.

Samlaðu rakstrasútreiðslurnar, áðrenn avskrivingar, vóru 259,6 mio. kr. Hetta er ein útreiðsluvøkstur uppá 72 mio. kr. ella uml. 29,9 mio. kr. meira, enn roknað varð við sambært fíggjarætlanina.

Útreiðsluvøksturin stavar fyrst og fremst frá óvanliga høgum oljuprísum, sum vóru í hæddini á sumri 2008, men eisini frá øðrum viðurskiftum, sum t.d. vanligum lønar- og prísvøkstri og frá serligum rakstrarútreiðslum, sum ikki koma fyri ár um ár.

Oljuútreiðslurnar vóru 119,9 mio. kr. móti 72,6 mio. kr. ári fyri. Høvuðsorsøkin til hendan útreiðsluvøkstur var sum nevnt óvanliga høgi oljuprísurin, men termiska framleiðslan vaks 11,9% ella 17,8 mio. kWh, og hevur tað eisini havt sína stóru ávirkan á meirnýtsluna til olju.

Í 2008 hava fleiri stórar serligar rakstraruppgávur ávirka útreiðslurnar. Av hesum kann nevnast, at endurnýggjan av elektronisku útgerðini á Sundsverkinum hevur í 2008 kostað 15,2 mio. kr., liðugtgerð av at endurbyggja tangagarðin og umvæling av minna goymslutanganum til tungolju í Vági kostaði 3,1 mio. kr. og høvuðsumvælingin av minna tungoljutanganum og gassoljutangunum á Sundsverkinum kostaði 6,6 mió. kr. Útivið 1 mio. kr. kostaði nýggja elveitingareftirlitið. Hetta er ein útreiðsla, sum ikki hevur verið áður og sum er ein fylgja av nýggju elveitingarlógini. Sum ein fylgja av somu lóg hevur SEV harumframt eisini havt eyka fyrisitingarútreiðslur til ráðgevarahjálp o.a.

Nettorentuútreiðslurnar vuksu frá 2007 til 2008 úr 2,3 til 3,5 mio. kr. Rentuútreiðslurnar av føstum lánum og bankakostnaður v.m. minkaðu úr 7 niður í 6,8 mio. kr. Men rentuinntøkurnar minkaðu enn meira, úr 4,7 mio. kr. niður í 3,2 mio. kr. Alt virksemi hjá SEV í 2008, eisini íløgurnar, varð fíggjað av rakstrinum og av tøka peninginum, sum minkaði munandi og tí gav minni rentuinntøku.

Avskrivingarnar vóru 48,4 mio. kr. móti 49,5 mio. kr. árið fyri. Nakað av tilgongd var til avskrivingargrundarlagi, meðan frágongdin av liðugt avskrivaðum íløgum var so mikið størri, at samlaðu avskrivingarnar minkaðu.

## ÍLØGUR

Íløgurnar í materiella støðisogn vóru 76,6 mio. kr. Hetta eru 38,3 mio. kr. minni enn ásett varð í upprunaligu fíggjarætlanini.

Størstu frávikini frá fíggjarætlanini stava frá, at brúktar vóru bert 24,3 mio. kr. av ætlanini uppá 35 mio. kr. til vatnorkuútbyggingina Eiði II. Harafturat vóru avsettar 8 mio. kr. til alduorku og 1 mio. kr. til vindorku. Stórt sæð onki av hesum upphæddum vóru brúktar í 2008.

Felags fyri íløguætlanirnar í vatn- og vind- og alduorku er, at ein partur av íløgunum, sum ikki vóru gjørdar í 2008, er fluttur til 2009.

## ÚTLIT FYRI RAKSTRARÁRIÐ 2009

Samtykta fíggjarætlanin fyri 2009, gjørd í november 2008, roknar við einum rakstraravlopi uppá 57,9 mio. kr. áðrenn avskrivingar uppá 50 mio. kr. ella 7,9 mio. kr. eftir avskrivingar.

Metingarnar av inntøkuni fyri 2009 byggja á, at SEV fær loyvi at hækka allar elprísir við 4 oyru/kWh frá 1. januar 2009, og at elnýtslan verður tann sama sum árið fyri. Elframleiðsluhagtølini fyri januar og februar 2009 benda á, at metingin um elnýtsluna fer at halda.

Hinvegin bendir nógv á, at SEV ikki fær myndugleikaloyvi at hækka elprísirnar, og verður inntøkan tí helst einar 10 mio. kr. minni, enn ásett í fíggjarætlanini.

Av útreiðslunum kann serstakliga roknast við stórum frávikum frá fíggjarætlanini, tá talan er um oljuútreiðslurnar, sum eru mettar til 97,3 mio. kr. Oljuprísirnir í oktober 2008 vóru grundarlagið undir hesi meting. Verða oljuprísirnir og USD-kursurin restina av 2009 á sama støði sum fyrsta partin av árinum, t.e. fram til 23. mars, so verða oljuútreiðslurnar helst einar 25–30. mio. kr. minni, enn roknað verður við sambært fíggjarætlanina.

Samanumtikið kann tí, við fyrivarni fyri gongdini í oljuprísunum, roknast við, at rakstrarúrslitið fyri 2009 verður helst nakað betri, enn tær 7,9 mio. kr. aftaná ætlaðar avskrivingar uppá 50. mio. kr., sum roknað er við í fíggjarætlanini, og verður úrslitið harvið nøktandi.

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Til eigararnar av elfelagnum SEV

### ÁTEKNING Á ÁRSFRÁSØGNINA

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008 við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, gjaldførisfrágreiðing og notum. Ársfrásøgnin er gjørd samsvarandi galdandi lóggávu.

### ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd samsvarandi galdandi lóggávu. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

### GRANNSKOÐANIN OG ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2008 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2008 samsvarandi galdandi lóggávu.

*Tórshavn hin 3. apríl 2009*

**RASMUSSEN & WEIHE**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Hans Laksá
løggildur grannskoðari

Jóannes Olsen
skrás. grannskoðari

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### ALMENT

Roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### INNTØKUR

Inntøkurnar frá elsøluni eru periodiseraðar. Við ársenda verður ársnýtslan gjørd upp fyri allar brúkarar.

### MATERIELL STØÐISOGN

Materiell støðisogn er tikin upp til kostprís, og avskrivað verður liniert. Avskrivingartíðin er frá 3 til 20 ár.

### FÍGGJARLIG STØÐISOGN

Fíggjarlig støðisogn er virðisásett til útveganarvirði.

### SKULDARAR

Skuldarar eru virðismettir hvør sær, og sett er av móti møguligum tapi.

### GOYMSLA

Goymslan av olju og tilfari verður virðismett til minsta virði av kostprísi og nýútveganarvirði.

### VIRÐISBRØV (UMFERÐARFÆ)

Lánsbrøv eru upptikin til kursjavnað virði.

### EGINOGN

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, har allar kommunur í Føroyum eru limir. Eginognin hjá teimum einstøku kommunum verður við árslok gjørd upp í mun til íbúgvaratalið.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Nota | 2008 | t.kr.<br>2007 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | **1** | **276.859.873** | **249.105** |
| Oljuútreiðslur og keyp av streymi | 2, 8 | -122.108.508 | -75.366 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 3, 4, 8 | -108.792.518 | -88.833 |
| Fyrisitingarútreiðslur | 3, 5 | -25.206.602 | -21.111 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar** | | **20.752.245** | **63.795** |
| Rentuútreiðslur | 6 | -3.532.925 | -2.293 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | | **17.219.320** | **61.502** |
| Avskrivingar | 7 | -48.357.208 | -49.466 |
| **Ársúrslit** | | **-31.137.888** | **12.036** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| **AKTIV** | **Nota** | **2008** | t.kr.<br>**2007** |
|---|---|---|---|
| Fastar ognir, elverk v.m. | 7 | 344.563.293 | 345.605 |
| Íløguarbeiði í gerð | | 46.070.150 | 16.773 |
| **Materiell støðisogn** | | **390.633.443** | **362.378** |
| Partapeningur | | 4.975.168 | 4.975 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | | **4.975.168** | **4.975** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | | **395.608.611** | **367.353** |
| Olja á goymslu | | 8.469.329 | 20.118 |
| Tilfar á goymslu | | 9.451.984 | 11.304 |
| Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning | | 623.216 | 775 |
| **Goymslur íalt** | | **18.544.529** | **32.197** |
| Elskuldarar | 9 | 35.794.423 | 29.029 |
| Skuldarar aðrir | | 4.868.438 | 2.681 |
| Onnur áogn | | 5.003.425 | 8.459 |
| **Skuldarar íalt** | | **45.666.286** | **40.169** |
| Lánsbrøv | | 39.286 | 80 |
| **Virðisbrøv** | | **39.286** | **80** |
| **Tøkur peningur** | | **24.267.689** | **99.526** |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | | **88.517.790** | **171.972** |
| **AKTIV ÍALT** | | **484.126.401** | **539.325** |
| **PASSIV** | | | |
| Innskot | | 4.139.875 | 4.140 |
| Kapitalkonto | 10 | 321.846.965 | 352.985 |
| **EGINOGN ÍALT** | **11** | **325.986.840** | **357.125** |
| Lán | 12 | 105.797.141 | 123.815 |
| **Langfreistað skuld** | | **105.797.141** | **123.815** |
| Elognarar | 13 | 18.667.142 | 13.002 |
| Aðrir ognarar | | 31.475.821 | 43.489 |
| Skyldug frítíðarløn | | 2.199.457 | 1.894 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **52.342.420** | **58.385** |
| **SKULD ÍALT** | | **158.139.561** | **182.200** |
| **PASSIV ÍALT** | | **484.126.401** | **539.325** |
| Eftirlønarskyldur | 14 | | |
| Veðsetingar | 15 | | |

## KAPITALFRÁGREIÐING

| (1.000 kr.) | 2008 | 2007 |
|---|---|---|
| Ársúrslit | -31.138 | 12.036 |
| Avskrivingar | 48.357 | 49.466 |
| **Likviditetsbroyting frá rakstri** | **17.219** | **61.502** |
| | | |
| Broyting skuldarar | -5.497 | -10.236 |
| Broyting stuttfreistað skuld | -6.044 | 22.676 |
| Broyting goymsla olja | 11.650 | -1.769 |
| Broyting goymsla tilfar | 2.004 | -638 |
| | 19.332 | 71.535 |
| | | |
| Íløgur: Støðisogn, broyting í arbeiði gerð | -76.613 | -52.038 |
| Partabrøv | 0 | 0 |
| Goldnir avdráttir | -18.018 | -18.930 |
| **Likviditetsbroyting** | **-75.299** | **567** |
| | | |
| Kassa- og bankapeningur primo | 99.526 | 98.914 |
| Lánsbrøv primo | 80 | 125 |
| **Likviditetur ultimo** | **24.307** | **99.606** |
| | | |
| Likviditetur ultimo: | | |
| Kassa- og bankapeningur | 24.268 | 99.526 |
| Lánsbrøv | 39 | 80 |
| | **24.307** | **99.606** |

## NOTUR TIL ÁRSFRASØGN

| | | t.kr. |
|---|---|---|
| **1. Inntøkur** | **2008** | **2007** |
| kWh-gjald o.a. | 255.881.252 | 229.627 |
| Fast gjald | 15.969.793 | 15.518 |
| Íbinding | 3.253.852 | 2.630 |
| Ómaks- og áminningargjøld og onnur søla | 1.754.976 | 1.330 |
| | **276.859.873** | **249.105** |
| | | |
| **2. Oljuútreiðslur og keyp av streymi** | | |
| Sundsverkið | 94.719.258 | 50.022 |
| Elverkið á Oyrunum | 14.182.411 | 13.279 |
| Elverkið á Skopun | 5.538.578 | 6.100 |
| Elverkið á Strond | 3.008.644 | 1.581 |
| Smáverk og bygningar | 2.474.321 | 1.583 |
| Keyp av streymi | 2.185.296 | 2.801 |
| | **122.108.508** | **75.366** |
| | | |
| **3. Lønir** | | |
| Løn verk, í notu 4 | 22.757.038 | 21.784 |
| Løn býtisvirkir v.m., í notu 4 | 18.615.403 | 16.507 |
| Løn fyrisiting, í notu 5 | 7.450.325 | 6.930 |
| Løn umboðsnevnd og stýri, í notu 5 | 1.303.840 | 1.420 |
| Løn tilgongd støðisogn | 1.926.982 | 2.153 |
| Løn til eftirlønt, í notu 5 | 756.632 | 682 |
| Eftirlønargjøld, í notu 4 og 5 | 4.358.001 | 3.575 |
| | **57.168.221** | **53.051** |
| | | |
| **4. Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| Verk | 66.521.239 | 53.836 |
| Bygningar | 1.768.764 | 1.774 |
| | **68.290.003** | **55.610** |
| | | |
| Koblingsstøðir | 2.436.302 | 810 |
| Býtisvirkir v.m. | 29.380.781 | 23.907 |
| Innleggingardeild | 4.171.507 | 3.776 |
| Projektering | 1.859.637 | 2.190 |
| Veikstreymsdeild | 2.654.288 | 2.540 |
| | **40.502.515** | **33.223** |
| | | |
| | **108.792.518** | **88.833** |

t.kr.

| 5. Fyrisitingarútreiðslur | 2008 | 2007 |
|---|---|---|
| Løn fyrisiting íroknað eftirlønargjøld | 8.154.737 | 7.311 |
| Løn umboðsnevnd og stýri | 1.303.840 | 1.420 |
| Lýsingar og telefon | 1.620.166 | 1.605 |
| Konsulent, prent, porto, edv o.a. | 2.272.181 | 1.888 |
| Ferðaútreiðslur v.m. | 747.639 | 591 |
| Frammanundankanningar og uttanhýsis ráðgeving | 3.283.786 | 1.825 |
| Bankakostnaður, ómaksgjøld | 1.734.177 | 1.532 |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 2.461.949 | 1.894 |
| | **21.578.475** | **18.066** |
| | | |
| Tryggingar | 579.592 | 754 |
| Tap av skuldarum | 496.423 | 144 |
| Eftirlønir | 756.632 | 682 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1.795.480 | 1.465 |
| | **25.206.602** | **21.111** |

| 6. Rentuútreiðslur | | |
|---|---|---|
| Renta av føstum lánum | 5.751.807 | 6.656 |
| Onnur renta og bankakostnaður | 1.024.863 | 352 |
| | 6.776.670 | 7.008 |
| Rentuinntøkur | -3.243.745 | -4.715 |
| | **3.532.925** | **2.293** |

| 7. Fastar ognir og avskrivingar | Saldo 1.1.08 | Frágongd og tilgongd 2008 | Avskriv. 2008 | Saldo 31.12.08 |
|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 182.404.017 | 3.232.316 | 22.470.888 | 163.165.445 |
| Býtisvirkir | 146.614.802 | 41.012.996 | 21.128.419 | 166.499.379 |
| Felagsognir | 8.279.495 | 0 | 1.976.954 | 6.302.541 |
| Jarðarognir | 2.692.969 | -24.000 | 0 | 2.668.969 |
| Onnur rakstrargøgn | 5.614.209 | 3.093.697 | 2.780.947 | 5.926.959 |
| | **345.605.492** | **47.315.009** | **48.357.208** | **344.563.293** |

t.kr.

| 8. Rakstur verk 2008 | Oljuútreiðslur | Tilfar | Lønir | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Maskindeild | 0 | 130.801 | 1.421.858 | 1.552.659 |
| Fossaverkið | 0 | 941.165 | 3.476.763 | 4.417.928 |
| Heygaverkið | 0 | 334.215 | 52.257 | 386.472 |
| Mýruverkið | 0 | 499.220 | 144.016 | 643.236 |
| Eiðisverkið | 4.550 | 170.099 | 339.235 | 513.884 |
| Verkið í Botni | 0 | 222.505 | 3.666 | 226.171 |
| Vágsverkið | 14.182.411 | 7.030.554 | 4.279.434 | 25.492.399 |
| Verkið á Tvøroyri | 0 | 137.201 | 14.596 | 151.797 |
| Sundsverkið | 94.719.258 | 29.728.904 | 11.425.192 | 135.873.354 |
| Skopun | 5.538.578 | 769.504 | 761.694 | 7.069.776 |
| Verkið KG | 3.008.644 | 353.636 | 1.150.162 | 4.512.442 |
| Vindmyllan 150 kW | 0 | 115.387 | 27.565 | 142.952 |
| Vindmyllan 750 kW | 0 | 340.036 | 33.287 | 373.323 |
| Smáverk (felagsarb. KG) | 0 | 16.413 | 0 | 16.413 |
| Mobilaggregat | 5.813 | 273.095 | 20.659 | 299.567 |
| Fugloy | 856.633 | 223.090 | 313.548 | 1.393.271 |
| Svínoy | 470 | 2.555 | 27.092 | 30.117 |
| Mykines | 360.286 | 113.248 | 300.393 | 773.927 |
| Hestur | 0 | 1.838 | 25.260 | 27.098 |
| Koltur | 102.106 | 115.265 | 69.636 | 287.007 |
| Nólsoy | 0 | 54.463 | 48.403 | 102.866 |
| Skúvoy | 412.095 | 145.320 | 283.603 | 841.018 |
| Dímun | 116.726 | 512.595 | 71.813 | 701.134 |
| | **119.307.570** | **42.231.109** | **24.290.132** | **185.828.811** |

| 9. Elskuldarar | | |
|---|---|---|
| Gjaldkomið í roknskaparárinum: | | |
| Vanligir brúkarar | 3.595.020 | 204 |
| Max. brúkarar | 4.664.810 | 1.198 |
| | **8.259.830** | **1.402** |
| Ikki gjaldkomið: | | |
| Vanligir brúkarar | 22.774.373 | 20.384 |
| Max. brúkarar | 5.760.220 | 7.743 |
| | **28.534.593** | **28.127** |
| | | |
| **Sett av til tap av elskuldarum** | **-1.000.000** | **-500** |
| | | |
| **Elskuldarar íalt** | **35.794.423** | **29.029** |

| 10. Kapitalkonto | | |
|---|---|---|
| Saldo primo | 352.984.853 | 340.949 |
| + Ársúrslit | -31.137.888 | 12.036 |
| **Saldo ultimo** | **321.846.965** | **352.985** |

| 11. Sundurgreining av eginogn | Kommunu-innskot | Eginogn 31.12.2008 | Eginogn 31.12.2007 |
|---|---|---|---|
| Hvannasund | 36.375 | 2.933.567 | 3.207 |
| Klaksvík | 502.000 | 32.670.186 | 36.045 |
| Fugloy | 17.500 | 267.295 | 317 |
| Svínoy | 18.250 | 267.295 | 354 |
| Viðareiði | 25.250 | 2.345.518 | 2.595 |
| Kunoy | 12.625 | 1.062.499 | 1.180 |
| Húsar | 17.500 | 387.578 | 442 |
| Eiði | 78.625 | 4.644.258 | 5.139 |
| Sunda | 177.367 | 11.025.937 | 11.730 |
| Fuglafjørður | 136.250 | 10.377.746 | 11.376 |
| Leirvík | 62.000 | 5.867.135 | 6.554 |
| Gøta | 84.500 | 7.237.024 | 7.911 |
| Nes/Runavík | 332.133 | 33.786.144 | 36.893 |
| Sjógv | 92.875 | 6.735.845 | 7.513 |
| Kvívík | 59.125 | 4.042.844 | 4.468 |
| Vestmanna | 125.250 | 8.386.395 | 9.046 |
| Sandavágur | 81.250 | 5.566.428 | 5.935 |
| Miðvágur | 88.375 | 7.470.908 | 8.140 |
| Sørvágur | 127.500 | 7.571.143 | 8.088 |
| Sandur | 72.250 | 3.909.196 | 4.254 |
| Skopun | 71.000 | 3.374.605 | 3.745 |
| Skálavík | 30.750 | 1.129.323 | 1.298 |
| Húsavík | 25.125 | 835.298 | 951 |
| Skúvoy | 17.875 | 367.531 | 442 |
| Hvalba | 103.625 | 4.898.189 | 5.596 |
| Tvøroyri | 255.250 | 11.827.823 | 13.234 |
| Famjin | 23.125 | 735.062 | 818 |
| Hov | 22.875 | 768.474 | 877 |
| Porkeri | 51.000 | 2.231.917 | 2.485 |
| Vágur | 218.375 | 9.388.753 | 10.462 |
| Sumba | 81.375 | 2.532.625 | 2.794 |
| Tórshavn | 1.092.500 | 131.342.299 | 143.236 |
| | **4.139.875** | **325.986.840** | **357.125** |

**12. Avdráttir, renta og restskuld av lánum (1.000 kr.):**

| | Upptikið lán | Niðurgoldið og avdráttir | Renta | Saldo pr. 31/12–08 | Saldo pr. 31/12–07 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lán** | **0** | **18.018** | **5.598** | **105.797** | **123.815** |

**13. Elognarar kr. 18.667.142**
Hetta er skuld til brúkarar, ið hava brúkt minni streym, enn teir hava goldið a conto fyri, og sum tí eiga pening tilgóðar hjá SEV.

**14. Eftirlønarskyldur**
Felagið rindaði í 2008 eftirløn til fýra fólk, sum ikki longur eru í starvi hjá SEV og hevur harumframt eftirlønarskyldu mótvegis tveimum starvsfólkum, sum framvegis eru í starvi hjá felagnum. Hesar skyldur eru ikki avsettar í roknskapinum.

**15. Veðsetingar**
Ongar av ognum felagsins eru veðsettar.

# BÝTISVIRKINI

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kallsoy | Eysturoy | Streymoy | Vágoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | Samtal | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6kV Transformarastøðir | 1 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 3 | stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 6 | 32 | 3 | 7 | | 61 | | | 1 | | | 16 | | | 48 | 175 | stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 2 | | | 108 | 73 | 28 | | | | 1 | | | | | 212 | stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 1 | | | 2 | 4 | | | | | | | | | | 7 | stk. |
| **Samtal økir** | **1** | **1** | **6** | **37** | **3** | **7** | **110** | **138** | **28** | **0** | **1** | **0** | **1** | **16** | **0** | **0** | **48** | **397** | **stk.** |
| 6kV Transformarar | 2 | | | 4 | | | | | | | | | | | | | | 6 | stk. |
| 10kV Transformarar | | 1 | 6 | 38 | 3 | 7 | | 71 | | | 1 | | | 18 | | | 56 | 201 | stk. |
| 20kV Transformarar | | | | 4 | | | 125 | 96 | 32 | | | | 1 | 1 | | | 3 | 262 | stk. |
| 60kV Transformarar | | | | 1 | | | 3 | 8 | | | | | | | | | | 12 | stk. |
| **Samtal økir** | **2** | **1** | **6** | **47** | **3** | **7** | **128** | **175** | **32** | **0** | **1** | **0** | **1** | **19** | **0** | **0** | **59** | **481** | **stk.** |
| 0,4kV kaðalskáp | 13 | 19 | 76 | 479 | 28 | 29 | 1544 | 2262 | 500 | 7 | 38 | | 10 | 211 | 11 | | 800 | 6027 | stk. |
| 60kV linja | | | | 1.04 | | | 39 | 42.4 | | | | | | | | | | 82.44 | km |
| 60kV kaðal | | | | 1.8 | | | 13.7 | 14.3 | | | | | | | | | | 29.8 | km |
| 20kV linja | | | | | | | 78 | 64.3 | 13.1 | | | | | | | | 12 | 154.3 | km |
| 20kV kaðal | | | | 8.2 | | | 135.3 | 134.1 | 33.6 | | | | 0.6 | 0.7 | | | 4.6 | 317.1 | km |
| 10kV linja | | 3.4 | 17.3 | 13.6 | 11.8 | 14.8 | | 9.9 | | | | | | 17.3 | | | 58.6 | 146.7 | km |
| 10kV kaðal | | 0.53 | 2.5 | 32.9 | 0.15 | 7.2 | | 64.8 | | | 1.5 | | | 23.8 | | | 53.2 | 186.58 | km |
| 6kV linja | 2.25 | | | 7.2 | | | | | | | | | | | | | | 9.45 | km |
| 6kV kaðal | 0.087 | | | 0.066 | | | | | | | | | | | | | | 0.153 | km |
| 0,4kV linja | | | | 0.76 | | | 1.2 | 0.9 | | | | | | | | | 1.4 | 4.26 | km* |
| 0,4kV kaðal | 1.06 | 3.63 | 11.3 | 56.8 | 2.64 | 3 | 190.2 | 272 | 55.1 | 0.551 | 3.4 | 0.373 | 0.865 | 25.9 | 0.881 | | 89.3 | 717 | km |
| Fjaravlisnir kWh málarar | | | 3 | 63 | | | 927 | 1312 | 638 | 1 | 169 | | | 7 | 51 | 2 | 14 | 3187 | stk. |
| Ikki fjaravlisnir kWh málarar | 61 | 75 | 264 | 2459 | 82 | 122 | 4395 | 9156 | 927 | 52 | 5 | 2 | 43 | 804 | 3 | 2 | 2877 | 21329 | stk. |
| **kWh málarar í alt/øki** | **61** | **75** | **267** | **2522** | **82** | **122** | **5322** | **10468** | **1565** | **53** | **174** | **2** | **43** | **811** | **54** | **4** | **2891** | **24516** | **stk.** |

*Alt í Suðuroy er ikki við. (t.d. linjur á Tvøroyri)

# SEV STUÐLAR ÁHUGAVERDARI KANNING AV SJÓVARFALSORKU

**1. mars fóru granskarar á Náttúruvísindadeildini undir forvitnisliga verkætlan til tess at fáa staðfest, hvar í Føroyum møguleikar m.a. eru fyri at fáa elorku burturúr sjóvarfallinum.**

*Hákun Djurhuus, stjóri í SEV (h.m.), ynskir Knud Simonsen góða eydnu við verkætlanini. Í miðjuni Hans Pauli Joensen, deildarleiðari á Náttúruvísindadeildini og Bárður Niclasen, granskari.*



Stýrið í SEV játtaði á síðsta fundi sínum í januar 250 tús. kr. í stuðuli til eina verkætlan, sum Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya skipar fyri undir enska heitinum "Mapping the tidal system energy potiental in the Faroe Islands."

Talan er m.a. um at fáa staðfest, hvar í Føroyum møguleikar eru fyri at fáa elorku burturúr sjóvarfallinum, og hvussu hetta fer at ávirka „tappaða" økið og leiðirnar nærindis.

Sjóvarfallsrákið millum oyggjarnar er mangastaðni hart, og røddir hava verið frammi um at útvinna ravmagn úr hesari varandi orkukelduni.

## FØROYSK KANNING BURTURAV

Knud Simonsen, havfrøðingur og lektari á Náttúruvísindadeildini, stendur á odda fyri verkætlanini.

Hann var í síni tíð eisini við í kanningunum, ið gjørdar vóru í Vestmannasundi í sambandi við uppskot um at gera eitt orkuverk har síðst í áttati-árunum.

Men tøknin, ið tá var tøk, var ikki mett at vera á einum støði, sum gjørdi eitt slíkt verk lønandi.

Síðani tá eru stór tøknilig frambrot gjørd uttanlands, og í fleiri londum eru ítøkiligar ætlanir um at gera sjóvarfalsstreymorkuverk.

## FLEIRI UNDANKANNINGAR GJØRDAR

Náttúruvísindadeildin hevur í nøkur ár arbeitt við at menna teldusimuleringar av sjóvarfallinum og gjørt streymmátingar.

Nú eru teir so farnir undir eina verkætlan við simuleringum við enn neyvari sjóvarfalsmyndlum, umframt at streymmátingar verða gjørdar í fleiri av høvuðssundunum til tess at kanna í hvønn mun, sjóvarfalsorkan á landgrunninum kann troytast

Umframt Knud Simonsen verður Bárður Niclasen knýttur at verkætlanini. Hann starvast sum projektsettur granskari á Fróðskaparsetrinum, har hann í seinastuni hevur arbeitt við aldumodulering.

## ONGIN VERKÆTLAN UTTAN STUÐUL

Umframt stuðulin frá SEV, hevur Knud Simonsen fingið 900 tús. kr. frá Granskingarráðnum til verkætlanina, sum samanlagt kostar hálva triðju miljón krónur.

Restina av kostnaðinum ber Fróðskaparsetrið við at seta neyðuga útgerð til taks og at rinda lønarútreiðslurnar.

– Uttan stuðulin frá SEV og Granskingarráðnum hevði snøgt sagt ikki borið til at farið undir hesa verkætlanina, sigur Knud Simonsen, sum samstundis fegnast um, at stuðulin eisini er við til at menna førleikan í Føroyum.

## GAGNAR EISINI ALIVINNUNI

Kanningarnar fara eisini at gagna ali- og útróðrarvinnuni, sigur hann.

– Við at læra sjóvarfalsrákið betri at kenna, verður lættari hjá okkum at staðfesta, hvar í Føroyum bestu umstøðurnar eru at ala tosk og laks, hvør útgerð er best hóskandi í hesum sambandi, um fiskasjúkur aftur fara at gera umseg og hvussu smittan kann spjaðast við rákinum, sigur Knud Simonsen.

Verkætlanin fer somuleiðis at hava við sær, at neyvari streymkort kunnu fáast til vega í framtíðini til gagns fyri m.a. útróðrarvinnuna.

## SEV BÍÐAR Í SPENNINGI

Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, sigur, at Elfelagið hevur gjørt av at stuðla hesi verkætlanini, tí umráðandi er hjá felagnum at kenna allar møguleikar innan nýtslu av varandi orkukeldum.

– Eftir okkara tykki er hetta ein upplagdur útbyggingarmøguleiki, sum ljós nú verður varpað á við hesi áhugaverdu verkætlan, og vit bíða í spenningi eftir úrslitinum, sigur SEV-stjórin.

Verkætlanin fer at taka tvey ár. Hon skal vera liðug 1. mars 2011.


Jákup Suni Lauritsen


Steinbjørn O. Jacobsen


Páll á Reynatúgvu


Kári E. Jacobsen


Marin Katrina Frýdal


Pauli Petersen


Niels Olaf Eyvindsson


*John P. Danielsen fíggjarstjóri og Ingeborg Godtfred skrivari undir lutakastinum um, hvør ið skuldi umboða Norðoyggjar í nevndini næstu fýra árini.*

# EIN NEVND HEVUR AVLOYST STÝRIÐ

1. januar 2009 komu nýggjar viðtøkur í gildi fyri Elfelagið SEV, ið høvdu við sær, at lutafelagið nú er skipað eftir einum partafelagslíknandi leisti.

Hetta merkir, at ein aðalfundur og ein nevnd hava avloyst ávikavist umboðsnevndina og stýrið, sum vóru frammanundan.

Eftir nýggju viðtøkunum hevur bert eitt umboð fyri hvørja kommunu atkvøðurætt á ársaðalfundinum, sum verður hildin í apríl. Umboðini hava eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal.

Á ársaðalfundinum verða ársfrágreiðing og ársroknskapur fyri undanfarna ár løgd fram til góðkenningar. Eykaaðalfundur verður hildin í november at góðkenna uppskot til fíggjarætlan fyri árið eftir.

## NEVNDARVAL

Aðalfundur til val av nýggjari nevnd fyri næstu fýra árini skal haldast í seinasta lagi tveir mánaðir aftaná, at kommunustýrisval hevur verið.

Fyrsti fundurin av hesum slagi eftir nýggju viðtøkunum varð hildin 6. februar 2009.

Allar limakommunurnar uttan Fámjins kommuna vóru umboðaðar á fundinum, tvs. 29 av 30 kommununum.

Nevndin verður mannað við einum umboði úr hvørjum av teimum sjey økjunum í landinum, sum eru: Norðoyggjar (6 komm.), Eysturoy (6), Norðurstreymoy/Sundalagið (3), Vágar (2), Suðurstreymoy (1), Sandoy (5) og Suðuroy (7).

Økini velja sjálv sínámillum nevndarumboð síni og varalimir.

## STRÍÐSVAL OG LUTAKAST

Á aðalfundinum 6. februar vóru tó fleiri stríðsval (í Sandoy, Norðurstreymoy/Sundalagnum, Eysturoy og Norðoyggjum), og í einum føri (Norðoyggjum) var enntá neyðugt við lutakasti til tess at finna nevndarlimirnar.

Úrslitið av valinum var, at hesi sjey komu í nevndina: Páll á Reynatúgvu, formaður, Sandi, Jákup Suni Lauritsen, næstformaður, Sørvági, Marin Katrina Frýdal, Hoyvík, Steinbjørn O. Jacobsen, Klaksvík, Kári E. Jacobsen, Glyvrar, Niels Olaf Eyvindsson, Nes-Hvalba, og Pauli Petersen, Vestmanna.

Varalimir eru: Bødvar Poulsen, Dali, Erik Davidsen, Sørvági, Heðin Mortensen, Tórshavn, Elsebeth G. Hansen, Jákup M. Kjeld, Toftir, Niclas Hentze, Sumba, og Martin Petersen, Kvívík.

Nevndin hevur vanliga ein fund um mánaðin. Fyrsti fundurin varð hildin 13. februar.





# 3.200 NÝGGIR TALGILDIR ELMÁLARAR SETTIR UPP

Tað gongst væl at seta teir nýggju, talgildu elmálararnar upp kring landið.

Síðani farið varð undir hetta arbeiðið í 2006, eru stívliga 3.200 nýggir elmálarar settir upp og bundnir í fjaravlestrarskipanina hjá SEV, meginparturin í Streymoy, Eysturoy og Vágum.

Fyrsta bygdin, ið varð bundin í skipanina, var Skúvoy. Síðani eru hesar bygdir komnar aftrat: Sørvágur, Vatnsoyrar, Kvívík, Nólsoy, Hamarin á Argjum, Kirkjubøur, Velbastaður, Kaldbak, Oyri, Oyrarbakki, Norðskáli, Svínáir, Ljósá, Tjørnuvík og Eiði.

Allar nýggjar útstykkingar kring landið verða eisini beinanvegin knýttar í fjaravlestrarskipanina.

Sostatt ber nú til hjá SEV at fjaravlesa elmálararnar í øllum hesum plássum og harvið eisini fáa virðismiklar upplýsingar um elkervið og góðskuna á spenninginum út til kundarnar.

## 24.500 ELMÁLARAR

Tað eru umleið 24.500 elmálarar í Føroyum, og allir hesir skulu takast niður, og nýggir skulu setast upp, sum kunnu samskifta við fjaravlestrarskipanina.

So hvørt sum fjaravlisnir málarar verða settir upp, fækkar talið á fólki, sum higartil hava bankað uppá í hvørjum húsi og lisið málararnar hjá SEV.

Á innleggingardeildini hjá SEV miðað teir eftir at seta upp 2.500 nýggjar elmálarar um árið, soleiðis at komið er á mál í 2018. Tá hava øll fingið nýggjar elmálarar.

Fyrsta dagin verður møguligt hjá teimum, ið hava fingið nýggjar elmálarar, at fylgja við elnýtsluni frá degi til dags á heimasíðuni hjá SEV.

Har ber frammanundan til hjá kundum at rokna út streymnýtsluna, grundað á ársuppgerðina á nýggjárinum, og soleiðis stýra síni streymnýtslu.

Við at sláa tølini á máleranum inn á heimasíðuna, kanst tú síggja, um tú skyldar pengar ella eigur pengar til góðar hjá Elfelagnum.

# MINSTI SKÚLIN VANN ÁRSINS SEV-KAPPING UM ORKUNÝTSLU

## Velbastaðar skúli luttók á fyrsta sinni í kappingini og vann ein bæði sannførandi og uppibornan sigur, frammanfyri 13 øðrum skúlum.

Níggju næmingar í 7. flokki á Velbastaðar skúla vunnu ársins skúlakapping hjá SEV um orkunýtslu.

Flokkurin varð á samkomu í Norðurlandahúsinum 1. apríl kosin vinnari av kappingini í ár.

Hetta var fyrstu ferð, Velbastaðar skúli var við í kappingini, og samstundis var hann minsti skúlin, sum var við hesa ferð.

Kortini vunnu velbastaðarbørn samanlagt ein bæði sannførandi og uppibornan sigur, frammanfyri 13 øðrum flokkum úr størri skúlum í landinum.



Bæði lærarar og næmingar í vinnandi flokkinum viðgingu, at kappingin stundum kendist somikið strævin, at tey meira enn eina ferð umhugsaðu at geva skarvin yvir.

Hetta gjørdi seg serliga galdandi í sambandi við ta kreativu uppgávuna, ið snúði seg um at gera uppskot til eitt lýsingarátak um elorkusparing, har málbólkurin var ungfólk í aldrinum 13–16 ár.

– Men tá tær báðar genturnar í flokkinum gjørdu greitt, at tær undir ongum umstøðum tóku undir við at sleppa endanum, gav hetta okkum øðrum nýggjan íblástur og orku til at halda fram, soleiðis at tað kortini eydnaðist okkum at koma á mál, og tað fegnast vit øll somul um í dag, segði ein av stoltu og fegnu lærarunum, Búi Dahl, eftir handanina av fyrstu virðislønini.

Fyrsta virðislønin er ein vikuskiftistúrur til Reykjavíkar fyri allan flokkin við Atlantsflog, sum stuðlar kappingini.

SEV fer at brúka lýsingaruppskotið hjá velbastaðarbørnunum í einum lýsingarátaki, ið serliga verður vent móti teimum ungu í aldrinum 13–16 ár. Endamálið er at eggja teimum til at minka um elnýtsluna bæði á skúlanum og heima við hús.

Myndin, ið prýðir permuna á hesi ársfrágreiðingini, er av vinnarunum av Velbastað. Ovara rað f.v.: Egi Kárason Djurhuus, Ólavur T. Patursson, Rannvá Egholm, Teitur Lassen og Dánjal Petur Jensen. Niðara rað f.v.: Saranja Hammer, lærari, Búi Dahl, lærari, Tinna í Garði Patursson og Ári Hansen. Tóki Hjartarson, Niclas Brimnes og Joan Neshamar, fyrsti lærari, vanta á myndini.

# SEV STUÐLAÐI TACC

## Í apríl 2008 var fyrrverandi varaforsetin og forsetavalevnið í USA og Nobel-heiðurslønarvinnarin, Al Gore, á vitjan í Føroyum.

Hetta var í sambandi við altjóða ráðstevnu um veðurlagsbroytingarnar í Atlantshavinum (Trans Atlantic Climate Conference), sum Vinnuhúsið og Bitland skipaðu fyri í Norðurlandahúsinum í døgunum 7. og 8. apríl.

Hetta var fyrsta ráðstevna av sínum slagi í Føroyum.

Al Gore var høvuðsrøðari á stevnuni, har ikki færri enn 31 aðrir fyrilestrarhaldarar úr Føroyum og hinum norðurlondunum og Bretlandi og USA luttóku.

Elfelagið SEV var millum fyritøkurnar, ið stuðlaðu tiltakinum, og fekk í hesum sambandi høvi at leggja fram grøna profil og visjón felagsins í einum týðandi altjóða forum.



*Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, avmyndaður saman við Al Gore í Norðurlandahúsinum.*

## SEV KUNNAÐ LANDSMYNDUGLEIKARNAR UM 10-ÁRA ÚTBYGGINGARÆTLANINA

Á kunnandi fundi fyri løgmanni, av-varðandi landsstýrisfólkum og løgtingslimum í januar greiddi SEV-leiðslan frá 10-ára útbyggingarætlanini hjá el-felagnum, sum umboðsnevndin einmælt samtykti í november í fjør.

Á fundinum, har fremstu embætisfólkini í landsumsitingini við løgmansstjóranum á odda og umboð fyri Jarðfeingi og Fjarskiftiseftirlitið eisini vóru við, varð somuleiðis kunnað um loyvið, sum SEV fáar dagar frammanundan hevði fingið frá Yvirfriðingarnevndini um at fremja restina av Eiði 2 verkætlanini – eisini nevnd Eiði 2 Suður.

Henda verkætlanin er eisini fyrsti partur av 10-ára útbyggingarætlanini, sum harumframt umfatar vatnorku úr Víkarvatni, økta vindorku og íløgur í termisku framleiðsluna á meginøkinum og í Suðuroy umframt í býtisvirkir v.m.

Samlaði kostnaðurin av ætlaðu útbyggingunum er mettur til 1,9 mia. kr., harav roknað er við einari miljard í lánum.

### 65% AV VARANDI ORKU Í 2018

Yvirskipaði orkupolitikkurin hjá landinum ásetur, at í minsta lagi 20% av orkuframleiðsluni á landi í 2015 skal stava frá varandi orkukeldum. Stýrið í SEV ásetti – samsvarandi hesum – fyri nøkrum árum síðani, at parturin av Elframleiðsluni, sum stavar frá varandi orkukeldum, skal økjast úr 45 til 55% í 2015.

Hetta sæst aftur í 10-ára útbyggingarætlanini, sum harumframt hevur sum mál, at 65% av Elframleiðsluni skulu stava frá grønari orku, tá komið er á mál í 2018.

Á fundinum varð spurningurin um møguligan elkaðal úr Íslandi eisini umrøddur. Her fyriliggur bert ein ávegis frágreiðing í løtuni, og umboð fyri m.a. Jarðfeingi og SEV gjørdu greitt, at fleiri kanningar skulu gerast aftrat, áðrenn málið er búgvið til politiska støðutakan.

Enn er tó ongin poltisk avgerð tikin um, hvørt haldast skal fram við hesum kanningum ella ikki.

# SEV SKJÓTT UNDIR EIÐI 2 SUÐUR



SEV fyrireikar seg í løtuni at fara undir sunnara part av Eiði 2-vatnorkuútbygginini, tvs. at leingja vatntunnilin frá Norðskála suður til Blásenda, norðanfyri Selatrað.

Yvirfriðingarnevndin góðkendi í januar – undir ávísum treytum – avgerðina hjá friðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu frá 10. mai 2006 um at ganga umsóknini frá SEV á møti.

Í januar í fjør varð farið undir norðara part av Eiði 2, sum snýr seg um at bora vatntunnil millum Sváinir og Norðskála. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í november í ár.

Arbeiðið at leingja vatntunnilin við tilhoyrandi skaktum, áarinntøkum og veitum frá Skálá og suður til Blásenda fer væntandi at taka trý ár.

### HEVUR TIKIÐ FIMM ÁR

Fimm ár eru liðin, síðani SEV sendi friðingarmyndugleikunum umsókn um loyvi at fara undir Eiði 2-verkætlanina.

At tað hevur tikið so langa tíð at avgreiða umsóknina, kemst m.a. av, at Yvirfriðingarnevndin í 2006 vildi hava eina árinskanning gjørda, áðrenn hon tók endaliga støðu í málinum.

Árinskanningin varð liðug og send Yvirfriðingarnevndini í apríl í fjør.

Sambært Yvirfriðingarnevndini gav kanningin ikki grundarlag til at halda, at verkætlanin fór at hava við sær slíkar skaðiligar avleiðingar fyri náttúruna, at loyvi ikki átti at verða givið.

– Sama um talan er um stórt inntriv í náttúruna, so hevur tað eisini stóran týdning, at vatnorka er ein „grøn“ orkukelda, sum samanumtikið fer væl um umhvørvið, segði Yvirfriðingarnevndin m.a. í grundgevingum sínum fyri at ganga umsóknini á møti.

### MINNI OLJA OG CO2

Eiði 2 verkætlanin fer at økja um vatnorkuframleiðsluna hjá SEV við tilsamans 16 mió. kW-tímum um árið. Hetta svarar til umleið 6,2 prosent av samlaðu framleiðsluni.

Eiði 1 og 3 ætlanirnar, ið gjørdar eru frammanundan, geva SEV tilsamans 40 mió. kW-tímar um árið.

Eiði 2 ætlanin ber í sær, at oljunýtslan hjá SEV minkar uml. 3.600 tons um árið og $CO_2$-útlátið við uml. 10.000 tonsum.

Eiði 2 er týdningarmikil partur av málsetningum hjá SEV at økja framleiðslupartin av varandi orku til 55% í 2015 í mun til 45% í dag.

### 10-ÁRA ÚTBYGGINGARÆTLAN LEGGUR KÓSINA

Í hesum sambandi hevur SEV gjørt eina 10-ára útbyggingarætlan, sum skal leggja kósina, og sum skal tryggja, at setningurin verður rokkin.

Vatnorkan fyllir nógv í heildarmyndini, men miðað verður eisini eftir at útbyggja vindorkuframleiðsluna.

Elveitingarlógin, sum kom í gildi á nýggjárinum, hevur serligar ásetingar um útbjóðing av vindorku, sum lata upp fyri kapping á økinum. SEV hevur valt at skipa seg soleiðis, at felagið fer at bjóða seg fram á jøvnum føti við aðrar áhugaðar vindorkuframleiðarar.

### ÁIN IKKI TURRLEGGJAST

Ein av treytunum hjá Yvirfriðingarnevndini fyri loyvinum til Eiði 2 Suður er, at hóskandi nøgd av vatni altíð er í Stórá/Skálá við Norðskála. Sostatt má vatn ikki takast úr ánni, um vatnmongdin er undir 4 litrar um sekundið.

Eisini skulu tilmælini í árinskanningini havast í huga.

Sambært teimum hevur SEV skyldu til at „kanna djóra- og plantulív í mold í føstum sýnistøkustøðum fimm ár eftir, at vatnorkan er sett í verk, og aftur tá ið 10 og 15 ár eru liðin, at „regluligar fuglakanningar skulu eisini verða íroknaðar“, at „áðrenn farið verður undir grevstur, verður svørðurin grivin omanav og fluttur og síðan lagdur aftur, tá ið arbeiðið er liðugt“ og at „fjarðakanningin verður endurtikin annaðhvørt ár næsta tíggjuáraskeiðið.“

### KOSTNAÐURIN 250 MIÓ. KR.

Norðari partur av Eiði 2 verkætlanini, sum er í gerð í løtuni, kostar umleið 67 mió. kr., og sunnari partur er mettur at kosta 155 mió. kr. Harumframt skal ein turbina aftrat setast upp á Eiðisverkinum, sum er mett at kosta 28 mió. kr., soleiðis at samlaði kostnaðurin verður uml. 250 mió. kr.

Arbeiðið verður fíggjað lutvíst við eginpeningi og lutvíst við lánum.

Arbeiðið verður boðið út so skjótt sum projekteringsarbeiðið er liðugt, væntandi í heyst.

# GRØNUR ROKNISKAPUR

Í Føroyum er ikki álagt virkjum at gera grønan rokniskap. SEV fer av sínum eintingum at gera grønan roknskap fyri alt virksemi felagsins. Roknskapurin skal geva innlit í tey umhvørvisárinini, ið standast av virkseminum hjá SEV. Endamálið er at betra um møguleikan hjá øllum áhugaðum at fylgja umhvørvisarbeiðinum og eisini at eggja okkum sjálvum til at seta umhvørvisarbeiðið í hásætið og harvið skapa vælvild fyri virksemi okkara. SEV vil eisini vísa, at vit taka ábyrgd og ynskja at ganga á odda við burðardyggari gagnnýtslu av okkara tilfeingi.

Niðanfyri sæst ein mynd av teimum høvuðsárinunum, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið ísv. framleiðslu av el:

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór termisk verk, Strond, Sund og Vágsverkið. SEV hevur seks vatnorkuverk, Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

SEV hevur harafturat fýra vindmyllur í Neshaganum í Eysturoynni.

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenning av fossilum brennievnum. Niðanfyri sæst útlátið av CO2 fyri virksemið hjá SEV.




# UMHVØRVIÐ

## Sambært viðtøkunum hjá Sev skal øll framleiðsla fremjast við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi.

SEV hevur tann 17. desember 2008 orðað Heilsu-, Trygdar og Umhvørvispolitikk (HTU), sum er alment tøkur á heimasíðuni hjá SEV (http://www.sev.fo) og hongur á øllum arbeiðsstøðunum.

Niðanfyri er nevndur tann parturin av HTU-politikkinum, sum snýr seg um umhvørvið.

- Vit skulu verja umhvørvið mest møguligt. Vit skulu halda okkara virki reint og ruddiligt og rudda upp eftir okkum.
- Vit skulu velja ta bestu atkomiligu tøknina við atliti at umhvørvi og búskapi. Alt tilfeingið og tilfar skal nýtast á skilabesta hátt.
- Vit skulu arbeiða skipað og miðvíst við heilsu, trygd og umhvørvi fyri áhaldandi at betra úrslitini á hesum økjum. Setast skulu stevnumið og virkisætlanir, ið støðugt verða dagførdar.
- Vit skulu hava eitt opið samstarv við avvarðandi myndugleikar til frama fyri framhaldandi menning innan heilsu-, trygdar- og umhvørvismál.
- Vit vilja tryggja, at lógir og myndugleikakrøv á heilsu-, trygdar- og umhvørvisøkjunum verða hildnar og virka fyri at halda landsins- og altjóða stevnumið á nevndu økjum.
- Tá valt verður millum tilfarsveitarar, arbeiðstakarar og samstarvsfeløg, skal metast um hugburð teirra viðvíkjandi heilsu-, trygdar- og umhvørvispolitikki.
- Vit vilja stimbra starvsfólkið til at verða virkin innan heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiði.

### Útlátið av $CO_2$ í 2008




| | |
|---|---|
| Útlát íalt: | 111.090 tons CO2 |
| Elframleiðsla íalt: | 275.829MWh |
| Specifik CO2: | 403 g/kaWh |

## UMHVØRVISGÓÐKENNING

Sett í gildi

Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sundi:
**11. mars 2004**

Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá SEV í Neshaga:
**14. mai 2004**

SEV hevur søkt um umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági og um endurnýggjan av góðkenning av elverkinum á Sundi.

# SOLEIÐIS MINKA VIT ORKUNÝTSLUNA OG $CO_2$-ÚTLÁTIÐ

Ein strategibólkur hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, har m.a. SEV var umboðað, læt í januar í ár úr hondum frágreiðing og tilmæli um, hvussu orkunýtslan og harvið $CO_2$-útlátið í Føroyum kann minka.

Tað er sera umráðandi fyri føroyskt vinnulív og samfelagið alt, at orkunýtslan og harvið $CO_2$-útlátið minkar.

Hetta sigur ein strategibólkur, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag setti at arbeiða við orku- og umhvørvisspurningum eftir altjóða veðurlagsráðstevnuna, sum Vinnuhúsið og Bitland skipaðu fyri í Føroyum í fjørvár.

Bólkurin handaði í januar landsstýrinum frágreiðing og tilmæli um, hvussu orkunýtslan og harvið $CO_2$-útlátið hjá Føroyum kann minka, so Føroyar í 2015 og frameftir kunnu teljast millum heimsins fremstu tjóðir.

## TRÝ MÁL FREMJAST SAMSTUNDIS

Frágreiðingin viðger í høvuðsheitum, hvønn týdning orka hevur í ymiskum vinnugreinum, og hvussu orkunýtslan og $CO_2$-útlátið kunnu minkast á ein hátt, so vinnan kann skapa grundarlag fyri tryggum og høgum livistøði í Føroyum.

Sambært frágreiðingini kunnu trý mál røkkast samstundis, um rætt verður atborið.

Í fyrsta lagi eiga føroysk virki at gera allar tær orkusparingar, ið loysa seg.

Í øðrum lagi mugu føroysku myndugleikarnir taka øll neyðug stig til tess at lúka tey krøv, ið sett verða í millumtjóða ST-sáttmálanum í Keypmannahavn í desember í ár. Í hesum sambandi skulu forðingar fyri orkusparingum í m.a. lógum og reglugerðum beinast av vegnum.

Føroyska samfelagið nýtir alt ov nógva orku til upphiting, og tí verður í triðja lagi mælt til, at ein landsbyggireglugerð verður gjørd, ið dagførir krøvini til bjálving av bygningum. Í hesum sambandi skulu krøv setast til orkulýsing av bygningum, so íløgur kunnu gerast til tess at minka um orkutørvin.

## ORKURÁÐ SKIPAST

Allar fyritøkur kunnu spara orku, men ymiskt er, hvat skal til fyri at røkka hesum máli og hvussu nógv kann sparast við vinningi.

Strategibólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at Orkuráð verður skipað við serkønum umboðum fyri tað almenna og vinnuna til tess at eggja til sparingar bæði hjá tí almenna, privatum og vinnuni.

Umframt at ráðgeva almenningin, skal Orkuráðið eisini koma við tilmælum um, hvørji politisk stig skulu takast til tess at minka um orkuútreiðslurnar og $CO_2$-útlátið.

Í strategibólkinum, sum gjørdi frágreiðing og tilmæli, sótu: Bergur Poulsen, Havsbrún, Magni Arge, Atlantic Airways, Johnny í Grótinum, Føroya Banki, Viberg Sørensen, Føroya Reiðarafelag, Joel undir Leitinum, Samskip, Hákun Djurhuus, SEV, Árni Jakobsen, SMJ, og Marita Rasmussen, Vinnuhúsið. Steinbjørn í Dali og Vilhjálmur Nielsen, Bitland, vóru skrivarar hjá bólkinum.

# UMFATANDI DAGFØRINGAR GJØRDAR Á SUNDSVERKINUM

– sum fara at minka munandi um streymslitini í framtíðini, ið stava frá motorbrekum.

Hetta seinasta árið eru umfatandi dagføringar gjørdar á Sundsverkinum.

Talan hevur serliga verið um at skifta út gomlu elútgerðina til motorarnar M4 og M5 umframt at mekaniskar tillagingar eisini eru gjørdar.

Í høvuðsheitum eru lágspennings- og stýritalvur skiftar út eins og frekvens- og spenningsregulatorar.

Hetta hevur lagt grundarlag undir eitt nýtt samkervi, har alt nú verður stýrt frá eini yvirskipaðari skipan.

Danska fyritøkan BWSC hevur staðið fyri dagføringunum av motorunum, sum SEV keypti frá teimum í ávikavist 1983 og 1987.

## FÆRRI STREYMSLIT Í FRAMTÍÐINI

Stórur dentur er lagdur á at gera skipanina so trygga sum møguligt. Í hesum sambandi er ein stórur partur av útgerðini og tólbúnaðinum tvískipaður.

Tíverri slapst ikki undan óhappum undir arbeiðnum, sum elvdu til ikki færri enn trý streymslit í meginøkinum í februar. Men nú arbeiðið er liðugt, fer hetta vónandi at minka munandi um streymslitini í framtíðini, ið stava frá motorbrekum.

Báðir MaK-motorarnar eru eisini tengdir at somu skipanini, soleiðis at bert ein skipan nú er fyri at kalla alt Sundsverkið.



Seinastu árini er ein automatisering eisini farin fram á Sundi av tangamálingum og pumpustýringum. Hesum arbeiði hevur SEV sjálvt staðið fyri, og er henda skipanin eisini tengd at nýggju stýriskipanini.

Ætlanin eru eisini at dagføra elsta motorin á verkinum, sum varð settur upp í 1979. Væntandi verður hetta arbeiðið gjørt seinni í ár.

# VARANDI ORKUKELDUR – LYKILIN TIL EINA BJARTARI FRAMTÍÐ



*Dagliga leiðslan á SEV. F.v.: Finn Jakobsen, tekniskur stjóri, Hákun Djurhuus, stjóri, og John P. Danielsen, fíggjarstjóri.*

**Tað tykist ikki at vera nakar ivi um, at mannaættin og okkara móðir jørð eru í vanda fyri hóttandi, mannaskaptum veðurlagsbroytingum.**

Ídnaðarkollveltingin hevði við sær nógv gott, men ein baksíða, sum nú er við at gerast ein hóttan fyri mannaættina, er stóra nýtsla okkara av koli og olju. Við nýtslu av hesum evnum lata vit út í atmosferuna vakstrarhúsgassir, sum virka sum bjálving av jørðini á slíkan hátt, at varmaútstrálingin frá jørðini minkar.

Tí er alneyðugt, at vit sum skjótast fáa lagt um til annan framleiðsluhátt, har hesi brennievni verða skift út við varandi orkukeldur. Hesar keldur hava allar sín uppruna í tí ovurhonds stóru orkukelduni, sum sólin er. Soleiðis tosa vit um at vinna orku burturúr sólini, regninum, vindinum, aldunum og sjóvarfallinum.

## EVROPA GONGUR UNDAN

Í Evropa hevur verið arbeitt nógv við hesum spurninginum og er hesin heimsparturin millum teir fremstu at finna loysnir á hesum økinum. Uttan at koma víðari inn á, hvussu torgreidd støðan er við muninum millum fátøk og rík lond, stóra fólkavøkstrinum, globalisering, búskaparviðurskifti, kappingarføri v.m., so skulu vit finna loysnirnar, tí sum tingmaðurin Magni Laksáfoss plagar at siga: „Vit mugu gera av við oljuna, áðrenn hon ger av við okkum."

Og lykilin til eina bjartari framtíð eru varandi orkukeldur.

Europa viðtók fyri fáum árum síðani ásetingina 20/20/20 í 2020. Hetta merkir, at málsetningurin hjá Europa er, at í 2020 skal orkunýtslan effektiviserast við 20%, útlátið skal minkast við 20% og 20% av orkunýtsluni skal koma frá varandi keldum.

## FØROYAR FYLGJA VIÐ

Í Føroyum verður eisini arbeitt við spurninginum. Politiska skipanin hevur í 2006 viðtikið politikk á hesum økinum, sum sigur, at í 2015 skulu 20% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi keldum, og tá skal eisini orkunýtslan hjá flotanum vera 15% minni pr. veidda eind.

SEV tekur undir við hesum politikki, og longu í 2005 viðtók stýrið hjá SEV ein málsetning á hesum økinum. Ásett varð tá, at í 2015 skulu 55% av orkuframleiðsluni koma frá varandi orkukeldum.

Fyri stuttum hava ráðgevarar hjá SEV dagført samlað yvirlit, sum vísir allar útbyggingarmøguleikarnar innan vatnorku í Føroyum.

## VINDURIN VINDUR UPPÁ SEG

Innan útbygging við vindorku skal hetta eftir nýggju elveitingarlógini gerast á tann hátt, at Elveitingareftirlitið í samráð við SEV bjóðar út hesar møguleikarnar. Fyrireikandi fundir hava verið um hetta, og hevur eftirlitið sagt frá, at tey rokna við fyrstu útbjóðing í august í ár. Í SEV hava vit fyrireikað okkum til hetta, m.a. hevur umboðsnevndin givið nevndini heimild at skipa sjálvstøðugt vindfelag, um tað skuldi gjørst neyðugt. Fyrireikingar við at seta upp fleiri myllur í Neshaga eru eisini í gongd.

SEV hevur við áhuga fylgt arbeiðnum hjá Risø kanningarstovninum at lýsa møguleikar fyri at koyra meira vindorkuframleiðslu inn á elnetið. Fyri ársskiftið kom ein fyribils frágreiðing, sum SEV hevur gjørt viðmerkingar til og síggja vit nú fram til at fáa endaliga úrslitið.

Eisini hevur SEV sett í verk kanning av vatnpumpuskipan, sum kann rekast við vindmyllum. Tøknin og búskaparviðurskiftini skulu lýsast og yvirlit skal gerast yvir allar møguleikarnar, sum kunnu koma uppá tal í Føroyum.

## SEV FYLGIR VÆL VIÐ

SEV fylgir sera neyvt við í gongdini innan elbilar, har frambrotini uttanlands m.a. verða gjørd fyri at kunna koyra meira vindorkuframleiðslu inn á elnetið.

Nógvar ymiskar royndir verða gjørdar at fáa orku burturúr aldum. SEV hevur longu í fleiri ár verið partur av einari menningarætlan í P/F Sewave saman við útlendskum turbinuveitara. Stígur kom í samstarvið og hevur hetta seinkað arbeiðnum at koma í gongd, men fyri stuttum komu partarnir til eina semju um, at turbinuveitarin skuldi taka seg úr ætlanina og lata SEV sín part av felagnum. Samstarv er fingið í lag við annan turbinuveitara og endalig projektring av royndarverkinum verður sett í verk so skjótt sum endalig fígging fyriliggur til tann partin. SEV er sinnað at lata sín bróðurpart, men skal eisini annar stuðul útvegast. Verður verkætlanin sett í verk, so er SEV sinnað at lata ein minni part av fíggingini, meðan bróðurparturin tá skal koma frá øðrum partaeigarum og/ella stuðlum.

Sum nevnt í aðrari grein er kanning nú sett í verk av møguleikunum fyri at útvinna el burtuúr sjóvarfallinum kring Føroyar. Roknað verður við, at úrslitið av kanningini fyriliggur um eini 2 ár. Ein fyrimunur við sjóvarfallsorku í mun til vind- og alduorku er, at her er talan um reglulig sveiggj í orkuintensitetinum, sum nógv lættari er spáa um frammanundan.

# SEV STUÐLAR FØROYSKUM GRANSKARA UTTANLANDS

Hevur fingið starv sum lektari á Newcastle University og ætlar at halda fram við gransking sínari innan orkusparandi og innovativar elmaskinur.

*Bogi Bech Jensen*
*Av skipsdekki í lektarastarv*
*á Newcastle University.*



Hann er 31 ára gamal, giftur og eigur tvær døtur.

Navn hansara er Bogi Bech Jensen, sonur Maiken og Árna Bech Jensen í Havn.

Í 1994 gjørdist hann sjómaður. Í 2000 tók hann prógv sum maskinmeistari og sigldi so aftur í tvey ár.

Síðani undirvísti hann í tvey ár á Maskinmeistaraskúlanum og las partstíð á Fróðskaparsetrinum, áðrenn hann og familjan pakkaðu kuffertið og fluttu til Onglands í 2004.

Í 2006 tók hann prógv sum sivilverkfrøðingur innan elorku.

## Í HOLT VIÐ PHD VERKÆTLAN

Í hálvttriðja ár hevur Bogi Bech Jensen starvast sum granskari.

Í september 2006 fór hann undir eina PhD verkætlan, har hugt verður at orkusparandi asynkronmaskinum – eisini nevndar kortslutnings- ella skammlopsmaskinur.

Skammlopsmotorar eru lívæðrin í ídnaðinum. Flestu vindmyllur brúka eisini skammlopsgeneratorar.

Skammlopsmaskinan er sostatt ein tann týdningarmesta elmaskinan á marknaðinum.

Sambært Boga Bech Jensen er trupulleikin við smáum skammlopsmaskinum, at virknaðarstigið ikki er serliga høgt, samanborið við elmaskinur av somu støðd við permanentum magnetum.

Fyrimunurin við skammlopsmaskinum er tó, at maskinan er ógvuliga sterk, hon er bílig at framleiða og krevur ikki ein kraftelektroniskan umformara fyri at virka.

– Phd verkætlanin hjá mær hyggur at, um tað er møguligt at minka um magnetiseringsstreymin við at brúka ein øðrvísi viklingshátt í statorinum og sostatt økja um virknaðarstigið, sigur Bogi Bech Jensen.

## GÓÐ ÚRSLIT

Og úrslitini higartil eru sambært føroyska granskaranum á heilt góðari leið.

– Tað er ikki so trupult at økja um virknaðarstigið, um framleiðslukostnaðurin á maskinuni hækkar samsvarandi. Men skal kostnaðurin vera kappingarførur við vanligu skammlopsmaskinuna, sum ikki er broytt stórvegis seinastu 70–80 árini, er avbjóðingin nógv størri, sigur Bogi Bech Jensen og heldur fram:

– Eg havi ment eina maskinu við hægri virknaðarstigi, men arbeiði nú við at menna ein framleiðsluhátt, sum liggur á sama kostnaðarstøði sum verandi framleiðsluhættir.

Sum tann lítillætni persónur, hann er, roknar Bogi Bech Jensen ikki við, at gransking hansara fer at bera í sær, at ídnaðurin fer at broyta framtíðar skammlopsmaskinur.

– Men mín gransking er eitt stig á leiðini at framleiða orkusparandi ellutir, leggur hann dent á.

## GÓÐAN STUÐUL ÚR FØROYUM

Tað kann verða rættiliga kostnaðarmikið at gera eina PhD innan verkfrøði, tí tað er ógvuliga vanligt at byggja eina, tvær ella fleiri prototypur í hesum sambandi.

– Granskingarráðið og Elfelagið SEV hava stuðlað verkætlanini, og stuðulin hevur verið avgerandi fyri, at eg kundi fara undir hana, sigur Bogi Bech Jensen avgjørdur.

– Eg bygdi eina prototypu í fjør og skal byggja eina aftrat í vár, har ein annar vóngevandi framleiðsluháttur verður nýttur. Ætlanin er at enda granskingina í september í ár og fáa doktararitgerðina frá hondini síðst í ár ella fyrst í næsta ár.

SEV stuðlar verkætlanini hjá Boga Bech Jensen við tilsamans 180.000 krónum.

## FLEIRI AÐRAR UPPGÁVUR

Ungi havnarmaðurin hevur síðani á sumri 2007 eisini luttikið í øðrum granskingarverkætlanum.

Frá september 2007 til september 2008 arbeiddi hann við at menna spolar við jarnkjarnu fyri Hoganas AB í Svøríki, sum er heimsins størsti framleiðari av jarnpulvuri.

Síðani september í fjør hevur hann arbeitt við at menna elmotorar til framtíðar elbilar fyri ein av heimsins største bilframleiðarum, sum tó ikki kann verða nevndur vegna "commercial sensitivity."

– Eg havi eisini luttikið í smærri ráðgevingaruppgávum, og arbeiði í løtuni við eini verkætlan fyri Siemens, har hugt verður at kjarnutapinum í einum 800 MW (800.000 kW) synkrongeneratori, sigur Bogi Bech Jensen.

Hann hevur longu fingið starv sum lektari á Newcastle University og ætlar at halda fram við gransking sínari innan orkusparandi og innovativar maskinur.






# ELFRAMLEIÐSLAN VAKS 2,4% Í 2008

Framleiðslan frá oljuriknu verkunum setti met.

Í 2008 vaks Elframleiðslan í Føroyum 2,4% samanborið við 2007.

Í meginøkinum (Norðoyggjar, Eysturoy, Streymoy, Vágar, Sandoy) vaks framleiðslan 3,3%, meðan hon í Suðuroy minkaði 6%.

## VATN- OG VINDFRAMLEIÐSLAN FALL

Elframleiðslan frá vatnverkunum var í 2008 95,9 GWH ímóti 104,5 GWH í 2007, sum var met. Sosatt fall Elframleiðsluni frá vatnverkunum í 2008 8,2%.

Samlaða Elframleiðslan frá vindmyllunum minkaði 17,7% í 2008 í mun til 2007. Orsøkin var, at árið í fjør var verri til vind enn 2007.

Vindmyllurnar hjá SEV í Neshaga framleiddu umleið 14% minni í fjør enn árið fyri, og vindframleiðslan, sum SEV keypti frá Røkt, fall heili 22%. Hetta kemst m.a. av, at vindmyllurnar hjá teimum fingu skaða í stormunum, sum vóru í februar 2008.

## TERMISKU VERKINI SETTU MET

Av tí at Elframleiðslan úr vatni og vindi fall munandi, framleiddi SEV í 2008 eina metstóra nøgd við teimum termisku verkunum. Sundsverkið framleiddi umleið 52% av samlaðu framleiðsluni hjá SEV í 2008 afturímóti 45% í 2007.

Danska fyritøkan BWSC var liðug við arbeiðið at dagføra motorin M4 á Sundsverkinum beint fyri jól.

Í desember 2008 byrjaði íverksetanin av fjarhitaveiting frá Sundsverkinum til Fjarhitafelagið.

Í løtuni verður eisini arbeitt við at implementera ISO 14001 á Sundsverkinum. Hetta arbeiðið verður vónandi góðkent á vári 2009.

## OLJUTANGAR OG TANGAGARÐAR

Goymslutangarnir 800 m3 GO og 4.000 m3 HFO á Sundsverkinum eru umvældir út í æsir í 2008. Teir hava í hesum sambandi eisini fingið nýggjan botn. Burtursæð frá gomlu bjálvingini á størra tanganum (sum verður skift út á vári 2009), kunnu báðir tangarnir metast sum nýggir.

Á Strond er tangagarðurin høvuðsumvældur í 2008. Nýggjur botnur er stoyptur og veggirnir eru eisini gjørdir av nýggjum. Somuleiðis er ein nýggjur oljuútskiljari settur upp í fránrenslinum úr tangagarðinum.

Í Koltri eru tríggir nýggir oljutangar við eini samlaðari goymsluorku uppá 9.000 litrar settir upp í 2008.

# STREYMURIN FÓR 27 FERÐIR Í FJØR

Til sammetingar kann nevnast, at í 1988 var streymurin burturi ikki færri enn 197 ferðir vegna brek á háspenningskervinum!

Hóast tað neyvan ber til heilt at sleppa undan brekum, ið elva til streymslit, so er tað ein sannroynd, at tilburðirnir av hesum slagi kring landið eru nógv fækkaðir seinastu 20 árini.

Sambært uppgerð frá rakstrardeildini hjá SEV, elvdu brek á háspenningskervinum í fjør til, at streymurin fór 27 ferðir ymsastaðni í landinum.

Til sammetingar kann nevnast, at í 1988 var streymurin burturi 197 ferðir!

Tó skal viðmerkjast, at tiltikna jólaódnin hetta árið, sum elvdi til miklan skaða kring alt landið, átti sín stóra lut í hesum ivasama meti.

Síðani 1988 er talið á streymslitum minkað javnt og samt, m.a. tí at SEV hevur lagt dent á at skifta loftlinjurnar út við jørðkaðalar.

Í 1990 var streymurin burturi 119 ferðir, og síðani 2000 – tá 91 brek vóru – hevur talan verið um 37 tilburðir í meðal um árið.

Av teimum 27 brekunum á háspenningskervinum í fjør hendu 8 í februar, 4 í november og 3 í desember. Í apríl, mai, juli og oktober vóru 2 brek um mánaðin og í juni og september 1 brek um mánaðin. Í mars og august vóru ongi brek staðfest.

Flestu brekini, 29,6%, hendu á linjunum. Brekini á elverkum stóðu fyri 22,2% og á triðjaplássi vóru kaðalbrekini við 18,5%, vísir uppgerðin hjá rakstrardeildini.

## NÝGGJ HÁSPENNINGSFELTIR Á ELVERKINUM Á STROND

Gomlu reyroll avbrótararnir á elverkinum á Strond vóru útskiftir tíðliga í vár. Hesir avbrótarar hava tænt fyri seg. Teir fyrstu av teimum vóru tiknir í brúk í 1949. Nýggju avbrótararnir eru frá ABB og eru útgjørdir við nýggjastu tøkni innan releverju.

## NÝGGJ HÁSPENNINGS-FELTIR Á MÝRAVERKINUM

Gomlu feltini eru frá tíðini, tá Mýraverkið varð gjørt. Hetta var í 1961 og nú var tíðin komin til útskifting. Nýggju feltini eru frá ABB og eru av somu typu sum feltini á Strond.








# ELVEITINGARLÓGIN OG SEV

**Elveitingarlógin varð endaliga samtykt 1. juni 2007 og staðfest 7. juni 2007. Lógin hevur í høvuðsheitum ta broyting við sær, at virksemið hjá SEV nú verður meira myndugleikaregulerað enn higartil.**

Konsessiónin frá 5. oktober 1963 gevur SEV loyvi at útbyggja vatnorku fram til 5. oktober 2013. Í loyvinum eru millum annað ásetingar um veitingarskyldu og eftirlit. Á hesum øki er ikki stórvegis munur á verandi loyvi og Elveitingarlógini.

### FLEIRI ELFRAMLEIÐARAR

Lógin leggur upp til, at sum frálíður verða fleiri elframleiðarar. Men tað verður ikki beinleiðis sagt, at SEV skal pettast sundur í fleiri feløg, eitt netfelag og eitt ella fleiri framleiðslufeløg. Hinvegin er ásett, at roknskaparligt sundurbýti skal gerast millum netvirksemið og framleiðsluvirksemið hjá SEV frá 1. januar 2009 at rokna. Við tað at SEV hevur eitt væl greinað bókhald, so hevur henda áseting ikki viðført stórar umleggingar og er broytingin longu sett í verk, soleiðis at roknskapurin fyri 2008 lýkur hetta krav. Møguliga verður neyðugt seinni at gera ávísar tillagingar í samráð við Fjarskiftiseftirlitið.

Í almennu viðmerkingunum til Elveitingarlógina sigur Vinnumálaráðið, at endamálið við lógini er millum annað:

- at landsstýrið fær yvirskipaðu ábyrgdina av eløkinum
- at møguleiki verður fyri fleiri elframleiðarum, fyrst og fremst á vindorkuøkinum.
- at orkuframleiðslan úr varandi orkukeldum, so sum vatni, vindi og øðrum verður økt.
- at prísurin fyri ravmagn ikki er hægri enn neyðugt við fyriliti fyri veitingartrygd, umhvørvi og øðrum tænastum og skyldum, sum samfelagið hevur mótvegis borgarunum.

### STØÐAN HJÁ SEV

Í øðrum broti av almennu viðmerkingunum staðfestir Vinnumálaráðið støðuna hjá SEV: „Broyttu orðingarnar hava tikið støði í tí staðfesting, at SEV verður roknað sum ein myndugleiki, og at kommunurnar eru eigarar av SEV, og at ætlanin við lógaruppskotinum skal fremjast í samstarvi millum lands- og kommunumyndugleikar.“ SEV tekur undir við hesum sjónarmiði og fer at leggja dent á, at besta úrslitið fæst í samstarvi. SEV tekur eisini undir við, at yvirskipaði orkupolitikkurin er ábyrgd hjá landsmyndugleikanum, eins og yvirskipaða endamálið við Elveitingarlógini eigur at vera tað.

Við kunngerð nr. 84 frá 30. september 2008 um býti av málsøkjum, hevur landsstýrismaðurin í Vinnumálum fingið fyrisitingina av elveitingarlógini, tó við undantak av § 16, sum liggur hjá landsstýriskvinnuni í Innlendismálum. Vinnumálaráðið hevur útdelegerað fyrisitingarheimildina til Fjarskiftiseftirlitið.

Sambært elveitingarlógin § 17, stk. 2, skulu loyvishavarar gjalda fyri umsitingina av lógini, og hevur hetta í 2008 kostað SEV 966.856,– kr.

### FYRSTA ÚTBOÐ Í AUGUST

Mannagongdin frameftir verður, at tað nú verður Fjarskiftiseftirlitið, sum metir um og gevur loyvi til nýggjar útbyggingar. Fyri vindorkupartin verður hetta gjørt við útboði, og hevur Fjarskiftiseftirlitið sum nevnt aðrastaðni boðað frá, at fyrsta útboð verður í august mánaða í ár. Fyri tann partin av vatnorkuútbyggingunum, sum er byrjaður, ella sum hevur tilknýti til verandi verk, fær SEV loyvi at fremja útbyggingar, uttan at Fjarskiftiseftirlitið skal taka støðu til hesar.

Higartil er mesta arbeiðsorkan innan innføring av lógini løgd í at orða tey loyvir, sum gevast skulu til netvirksemið og til framleiðsluverkini. Umframt nógv teknisk viðurskifti, so innihalda hesi loyvini eisini ásetingar um tey búskaparligu rammukoruni, sum virksemið skal rekast undir. Tann 30/12–2008 fingu vit fyribilsloyvi til alt virksemi okkara, men hava SEV og Fjarskiftiseftirlitið í løtuni ikki heilt somu fatan av búskaparligu viðurskiftunum. Partarnir eru í samráðingum um hesi viðurskifti.



*Stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum, Jógvan Thomsen, avmyndaður á fundi í januar, har SEV legði fram 10-ára útbyggingarætlan sína fyri løgtings- og landsstýrisfólkum o.ø. myndugleikum.*



*Tað gekk bæði skjótt og væl at leggja nýggja kaðalin um Skopunarfjørð.*

# NÝGGJUR SJÓKAÐAL TIL SANDOYNNA

## Fyrst í august varð nýggjur sjókaðal lagdur um Skopunarfjørð ístaðin fyri gamla kaðalin, sum varð tikin upp beint fyri ólavsøku.

Svenska kaðalskipið „Pleijel" hjá reiðarínum Baltic Offshore stóð fyri hesum arbeiði í samstarvi við SEV.

Gamli kaðalin millum Kirkjubø og Skopun frá 1984 slitnaði í februar 2007, og meðan bíðað varð eftir nýggjum kaðali, fekk Sandoyggin streym frá oljurikna elverkinum hjá SEV í Skopun.

Nýggi kaðalin, ið er 9,6 km langur, varð keyptur frá Prysmian í Italia fyri góðar 19 mió. kr. Samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiðið var uml. 22 mió. kr.

Kaðalin er tvífalt styrktur og vigar 41 kg/m. Leiðararnir eru 120 mm2 kopar.

Eftir at Sandoyggin aftur var bundin í meginøkið og fær streym haðani, er verkið í Skopun steðgað. Í framtíðini verður tað bert nýtt sum eykaverk at taka til.

### GAMLI KAÐALIN BRÚKTUR AÐRASTAÐNIS

Tær báðar vikurnar, „Pleijel" var í Føroyum, gjørdi skipið eisini onnur arbeiði fyri SEV. M.a. løgdu teir tað, ið kundi endurnýtast av gamla Sandoyarkaðalinum, tvørturum Trongisvágsfjørð og Sundalagið.

Ein teinur uppá 1,1 km varð lagdur um Trongisvágsfjørð, og ein teinur uppá 1 km varð lagdur út millum Eiðisverkið og Haldórsvík.

Her liggja kaðalar frammanundan, men eru hesir um 30 ára gamlir og nógv slitnir av brimi og ødrum.

Tað, sum ikki kundi endurnýtast av Sandoyarkaðalinum, varð selt til kaðalverksmiðjuna hjá NKT í Danmark.

„Plejel" legði eisini nýggjan kaðal tvørturum Kaldbaksfjørð, millum Sund og Kaldbak, og tvørturum Funningsfjørð, millum Elduvík og Funning.

Hetta eru tvey strekkir, sum leingi hava staðið á ynskilistanum hjá rakstrardeildini hjá SEV, fyri at bøta um møguleikan at streymveita hesi økini.

### LUFTSPENNIÐ UM LEIRVÍKSFJØRÐ TIKIÐ NIÐUR

„Pleijel" tók eisini 20 kV luftlinjuna um Leirvíksfjørð upp úr sjónum, eftir at hon var klipt niður. Spennið varð loyst á Borðoynni fyrst og síðani á Eysturoynni.

Tá Norðoyatunnilin varð gjørdur, varð ein 20 kV kaðal lagdur ígjøgnum hann, og tí var ikki longur brúk fyri luftlinjuni. Talan var um fýra linjur, sum vórðu spentar um Leirvíksfjørð miðskeiðis í sekstiárunum.

## AVROKNAÐ ELSØLA 2004–2008 Í MWH

| Kundabólkur 2004 | Tilsamans 2004 | Tilsamans 2005 | Tilsamans 2006 | Tilsamans 2007 | Tilsamans 2008 | Broyting 2007–2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna. | 22.790 | 17.154 | 19.403 | 23.364 | 23.228 | -0,6 |
| 2. Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 53.399 | 52.284 | 57.184 | 58.845 | 58.775 | -0,1 |
| 3. Handils-, matstovu- og gistingarhúsvirksemi | 19.050 | 19.336 | 20.451 | 22.124 | 22.804 | 3,1 |
| 4. Flutningur, postur og fjarskifti | 16.467 | 20.155 | 22.518 | 23.144 | 24.384 | 5,4 |
| 5. Fíggjing, trygging og aðrar vinnutænastur | 3.576 | 3.806 | 3.984 | 4.075 | 4.161 | 2,1 |
| 6. Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur v.m. | 32.702 | 34.483 | 34.885 | 39.745 | 41.195 | 3,6 |
| 7. Gøtuljós | 5.954 | 6.193 | 6.588 | 6.739 | 6.967 | 3,4 |
| 8. Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 73.451 | 75.734 | 76.585 | 78.761 | 77.387 | -1,7 |
| **Avroknað elsøla íalt** | **222.389** | **229.145** | **241.598** | **256.797** | **258.901** | **0,8** |
| Eginnýtsla hjá SEV | 5.599 | 5.417 | 5.556 | 5.555 | 5.555 | 0,0 |
| Avroknað elnýtsla íalt | 232.988 | 234.562 | 247.154 | 262.352 | 264.456 | 0,8 |
| Elframleiðslan álmanakkaárið | 248.967 | 244.877 | 259.478 | 269.416 | 275.829 | 2,4 |

Viðm: Avrokn. elsøla fylgir ikki neyvt álmanakkaárinum, meðan elframleiðslan verður uppgjørd við árslok á hvørjum ári.

Munur millum avroknaða elsølu og uppgjørda framleiðslu er tap í linjum og transformarum umframt eginnýtsla og forskjótingar í avlestrartíðarskeiðnum.

Íroknað elframleiðsluna er keypt el frá øðrum framleiðarum.

## ÍLØGUR HJÁ SEV 1995–2008

Talva 9.9

| Íløgur (mió. kr.) | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vatnorkuverk | 4.7 | 30.7 | 35.1 | 43.3 | 13.7 | 8.6 | 8.6 | 0.0 | 0.3 | 0.3 | 0.5 | 4.0 | 27.4 |
| Onnur elgerðarverk | 0.3 | 0.1 | 0.1 | 1.1 | 5.8 | 30.4 | 18.1 | 52.0 | 18.0 | 20.0 | 2.3 | 2.8 | 5.0 |
| Býtisvirkir | 9.3 | 12.5 | 21.0 | 13.8 | 13.6 | 14.6 | 19.5 | 17.4 | 18.6 | 18.2 | 32.8 | 41.9 | 41.1 |
| Felagsognir | 2.2 | 0.5 | 0.1 | 1.8 | 0.7 | 0.1 | 0.0 | 0.1 | 0.8 | 0.0 | 0 | 0.8 | 0.0 |
| Jarðarognir | - | - | - | - | 1.5 | -4.8 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0 | 0.0 | 0.0 |
| Onnur rakstrargøgn | 2.0 | 2.1 | 1.8 | 2.6 | 1.5 | 2.4 | 1.7 | 2.4 | 2.0 | 3.2 | 2.2 | 2.5 | 3.1 |
| Tilsamans | 18.5 | 45.9 | 58.1 | 62.6 | 36.8 | 51.3 | 47.9 | 71.9 | 39.7 | 41.7 | 37.8 | 52.0 | 76.6 |

*Kelda: SEV*

# MASKINYVIRLIT PR. 31. DESEMBER 2008

2008

| Staður | Maskina | MW | Hk | Maskintypa | Maskinframleiðari | Drív evni | Ár | Aldur | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Botnur | T1 | 1.00 | 1,360 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 43 | 169,713 |
| Botnur | T2 | 2.00 | 2,719 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 42 | 130,085 |
| Eiðisverkið | T1 | 6.70 | 9,109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 21 | 75,472 |
| Eiðisverkið | T2 | 6.70 | 9,109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 21 | 70,628 |
| Neshagi | M1 | 0.15 | 204 | Vindmylla (fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 15 | |
| Neshagi | M2 | 0.66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 3 | 20,233 |
| Neshagi | M3 | 0.66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 3 | 21,096 |
| Neshagi | M4 | 0.66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 3 | 21,815 |
| Skopunarverkið | M1 – M3 | 1.83 | 2,483 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | 24 | |
| Småverk | | 1.70 | 2,311 | 4-T | Deutz, Mercedes, Perkins | Gassolja | | | |
| Strond | M1 | 0.50 | 680 | 4-T HFB7 | Mirrleese Blackstone | Gassolja | 1950 | 58 | 30,135 |
| Strond | M2 | 2.30 | 3,127 | 4-T KV 12 SS | Mirrleese Blackstone | Gassolja | 1965 | 43 | 78,627 |
| Strond | M3 | 3.60 | 4,895 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 26 | 43,150 |
| Strond | T1 | 1.40 | 1,903 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 10 | 33,027 |
| Sundsverkið | M1 | 8.10 | 11,013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2001 | 7 | 25,297 |
| Sundsverkið | M2 | 8.10 | 11,013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 4 | 19,539 |
| Sundsverkið | M3 | 5.70 | 7,750 | 4-T KV16MAJOR | Mirrleese Blackstone | Tungolja | 1978 | 30 | 78,051 |
| Sundsverkið | M4 | 12.40 | 16,859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1983 | 25 | 135,194 |
| Sundsverkið | M5 | 12.40 | 16,859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1988 | 20 | 108,995 |
| Tvøroyri | M1 | 2.00 | 2,719 | 4-T | Nohab | Gassolja | 1973 | 35 | 81,517 |
| Vágsverkið | M1 | 2.70 | 3,671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 25 | 103,578 |
| Vágsverkið | M2 | 2.70 | 3,671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 25 | 104,256 |
| Vágsverkið | M3 | 4.32 | 5,874 | 4-T 9M32C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 4 | 28,672 |
| Vestmanna | Fossá 1 | 2.10 | 2,855 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 55 | 195,758 |
| Vestmanna | Fossá 2 | 4.20 | 5,710 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 52 | 305,300 |
| Vestmanna | Heygav. 1 | 4.90 | 6,662 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 45 | 190,765 |
| Vestmanna | Mýruv. 1 | 2.40 | 3,263 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 47 | 317,166 |
| | | | | | **Samlaður máttur:** | **101.85** | **MW** | | |
| | | | | | | **138.51** | **Hk** | | |

## Oljunýtslan í tonsum 1988–2008




## Maks. last og tøkur máttur – Meginøkið 1954–2008



## Elframleiðslan fyri alt landið, býtt sundur í elverksøkir, 2008




## Elframleiðsla pr. íbúgva í Føroyum 1970–2008




## Elframleiðslan í Suðuroy 1954–2008




## Elframleiðslan fyri alt landið 1954–2008



**Døgnlastin 7. oktober 2008**




**Alt SEV**
**Loypandi 12-mánaðar elframleiðsla frá 1985 til 2008**



SEV
Landavegi 92
Postsmogu 319
110 Tórshavn
tel 34 68 00
fax 34 68 01
t-postur: sev@sev.fo

SEV
Fitjum
Postsmogu 94
355 Vestmanna
tel 34 68 00
fax 34 68 03

SEV
Postsmogu 110
710 Klaksvík
tel 34 68 00
fax 34 68 05

SEV
Postsmogu 3
910 Vági
tel 34 68 00
fax 34 68 07

www.sev.fo